# Sjálvbjargnar, samhaldsfastar og tíðarhóskandi Føroyar

2025
2024
2023
2022
2021

**2020**

Fíggjarmálaráðið

## Búskaparfrágreiðing I

**Mars 2019**

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

# Innihald

**Uppskot til samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2020 ........ 3**

**Inngangur ........ 24**

**Lýsing av gongdini í búskapinum ........ 25**

*Fleiri óvissur eru fyri komandi 1-2 árini* ........ 26
*Tekin um fløskuhálsar, men ovhiting sæst ikki í búskapinum* ........ 27

*Fiski-, ali- og byggivinna nógv vaksnar síðstu árini ........ 28*
*Gongdin á arbeiðsmarknaðinum* ........ 31
*Eftirspurningur og brúkaraprísir* ........ 33
*Gongdin í til- og fráflyting* ........ 35

*Viðskifti við útlond, handils- og gjaldsjavni ........ 38*

*Heimsbúskapurin ........ 40*

*Almenn fíggjarmál ........ 42*
*Tilmæli viðvíkjandi kommununum* ........ 45

Tinganes • Box 2039 • FO-110 Tórshavn
☏ (+298) 35 20 20 • fmr@fmr.fo • www.fmr.fo

Løgtingið

**Tórshavn**, 26. mars 2019

**Løgtingsmál nr. 174/2018: Uppskot til samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2020**

**Uppskot**

**til**

**samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2020**

Við hesi løgtingssamtykt tekur Løgtingið undir við, at samlaði útreiðslukarmurin á løgtingsfíggjarlógini fyri 2020 verður 5.439,4 mió. kr. Rakstrarkarmurin verður 5.011,4 mió. kr., og íløgukarmurin verður 428,0 mió. kr. Samlaði inntøkukarmurin verður 5.940,0 mió. kr.

Úrslitið á løgtingsfíggjarlógini fyri 2020 verður 928,6 mió. kr. áðrenn íløgur. Íroknað íløgur verður úrslitið 500,6 mió. kr.

Í talvuni niðanfyri eru samlaðu játtanarkarmarnir fyri 2020 býttir á greinar.

| **Játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2020** | | |
|---|---|---|
| *Mió. kr.* | **Rakstur** | **Íløgur** |
| § 1 Løgtingið | 61,5 | 0,0 |
| § 2 Løgmansfyrisitingin | 40,3 | 2,0 |
| § 3 Fíggjarmál | 333,5 | 20,0 |
| § 5 Fiskivinnumál | 177,9 | 74,0 |
| § 7 Mentamál | 1.139,7 | 21,0 |
| § 11 Heilsumál | 1.266,9 | 114,0 |
| § 12 Almannamál | 1.601,9 | 48,0 |
| § 13 Uttanríkis- og vinnumál | 130,3 | 3,0 |
| § 17 Samferðslumál | 259,4 | 146,0 |
| ***Útreiðslur tilsamans*** | **5.011,4** | **428,0** |
| **Útreiðslukarmur** | **5.439,4** | |
| **Inntøkukarmur § 20** | **5.940,0** | |
| **RLÚ-úrslit** | **500,6** | |

Til tess at røkka ætlaða úrslitinum á løgtingsfíggjarlógini fyri 2020 er grundarlagið tær givnu fortreytirnar fyri framrokningum, raðfestingum og tillagingum á útreiðslu- og inntøkusíðu landskassans, soleiðis sum lýst í viðmerkingunum til uppskotið til samtyktar.

**Viðmerkingar**
Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum leggur við hesum, vegna landsstýrið, fram uppskot til løgtingssamtykt um játtanarkarmar fyri løgtingsfíggjarlógina í 2020.

Við játtanarkørmunum – ið sambært § 8, stk. 1 í løgtingslóg um landsins játtanarskipan skulu verða lagdir fram innan 1. apríl – ásetir Løgtingið yvirskipaða fíggjarpolitiska karmin fyri komandi árið. Tað vil siga, at játtanarkarnarnir eru avgerandi fyri, hvussu stórt fíggjarliga rásarúmið verður komandi ár.

Játtanarkarmarnir fyri 2020-2024 leggja dent á skynsaman fíggjarpolitikk, við vaksandi avlopum hjá landskassanum úr 500 upp í 700 mió. kr. Fíggjarkarmurin fyri 2020 rúmar einum varnum rakstrarvøkstri komandi ár á 3,5%. Sæð í mun til stóra fólkavøksturin, lønar- og prísvøksturin, og broytingarnar í fólkasamansetingini, verður mett, at uppskotið hevur tálmandi ávirkan á búskapin, ið búskaparpolitiskt eisini er skynsamt, nú stór framgongd er í búskapinum 7. árið á rað.

**Bakstøði**
Tá ið samgongan tók við, vóru ongar av stóru nýskipanunum framdar, og ótryggleiki valdaði í fiskivinnuni, tí veiðirættindini, ið vórðu uppsøgd í 2007, vóru við at ganga út. Menningin av heilsuverkinum, almannaøkinum og útbúgvingar- og mentanarøkinum hevði leingi ligið á láni, og landskassin hevði havt hall heili átta ár á rað. Fram til 2015 var eisini ein vaksandi ójavni í samfelagnum, og heldur eingi stig vóru tikin á sjálvbjargnisleið.

Samgongan valdi alt fyri eitt at broyta inntøkugrundarlagið. Heldur enn at hækka lønarskattin hjá hvørjum einstøkum, valdi samgongan at lata alivinnuna og fiskivinnuvinnuna rinda eitt meira rímiligt gjald fyri síni framíhjárættindi, samstundis hækkaðu nøkur einstøk avgjøld. Hetta hevur givið samgonguni í alt yvir 300 milliónir krónur eyka at raðfesta fyri.

Vit valdu at raðfesta átøk, sum fyrst og fremst stimbraðu fólkavøkstur, eina økta vælferð, eitt javnari samfelag og størri sjálvbjargni, samstundis sum vit hava lagt pening til síðis til verri tíðir.

Ongantíð áður eru so grundleggjandi broytingar gjørdar í góðum tíðum. Við broytingum í fiskivinnuni, í alivinnuni, á pensjónsøkinum og við skattaumleggingini hava vit tryggjað, at tað er tryggari og liviligari í Føroyum. Vit hava sum samfelag sett fleiri met. Pensjónirnar eru hækkaðar meira enn nakrantíð, talið av læknum og lesandi er methøgt, og útbúgvingar- og mentanarøkið er styrkt meira enn nakrantíð.

Raðfestingarnar hjá samgonguni hava verið við til at tryggja eitt metstórt fólkatal, løntakaratal, metnógvar fyritøkur og metstór yvirskot hjá vinnuni.

Nú ræður um at halda fast og halda fram, so vit ikki enda aftur í fortíðini og missa tað, ið vunnið er.

Við skynsama fíggjarpolitikkinum ber til at halda fram við at raðfesta útbúgvingarøkið, almannaøkið og ikki minst heilsuøkið, sum fær oman fyri 70 milliónir krónur í meirjáttan í 2020.

Tað ber ikki til at raðfesta uttan at fíggja. Tað ber ikki til, at eingin skal rinda til felagskassan og samstundis skapa fólkavøkstur, økja vælferðina, niðurrinda skuld og at leggja pening til síðis.

Hetta er ikki tíðin til at geva ófíggjað lyfti, ella minka gjøldini hjá fiskivinnuni ella alivinnuni niður í einki, og at hótta við at rulla verandi skipanir aftur. Alt hetta hóttir sterka búskap okkara, vælferðina, samhaldsfestið og framtíð okkara.

Skulu komandi árini eisini roynast væl, krevst, at tað verður hildið fast um nýskipanirnar, skynsama fíggjarpolitikkin, har peningurin verður lagdur til síðis til verri tíðir, og at kósin móti einum samhaldsføstum, sjálvbjargnum og tíðarhóskandi samfelag heldur fram.

## Búskaparpolitikkur og høvuðsmál – gongdin higartil

14. september 2015 varð samgonguskjal undirskrivað millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Framsókn. Saman hava flokkarnir samtykt fíggjarlógir fyri árini 2016-2019, og er árið 2020 fimta árið, har samgongan leggur fram uppskot um fíggjar- og búskaparpolitikk landsins.

Samgongan hevur frá byrjan lagt seg eftir at føra ein varnan og langtíðarhaldføran fíggjarpolitikk við atliti at einum meira jøvnum býti av ríkidøminum, øktari virðisskapan og størri sjálvbjargni.

Hesi mál hevur samgongan áhaldandi hildið seg til, og gongdin talar fyri seg.

*Búskapurin sterkari og sjálvbjargnari*
Sum heild er føroyski búskapurin sterkari og meira sjálvbjargin nú enn í 2015. Bæði húsarhald, vinnan, kommunur og land, hava bjálvað seg fíggjarliga seinastu árini.

- BTÚ +21% ella +3,5 mia. kr. Er nú mett til 20,3 mia. kr.
- Fólkatalið +5,6% ella +2.800 fleiri íbúgvar. Eru nú 51.440 fólk.
- Løntakarar +12,5% ella um 3.000 fleiri. Eru nú 27.500 løntakarar.
- Arbeiðsloysið minkað úr 3,3% niður í 1,1%, og hetta er tað lægsta, ið nakrantíð er uppgjørt.
- Avlop landskassans +1,4 mia. kr. Í mun til -1,1 mia. kr. undanfarna valskeið.
- Nettoskuld landskassans lækkað úr 2,4 mia. kr. niður í 0,8 mia. kr. (lánsbrævaskuld frádrigið gjaldføri).
- Húsarhald +2,4 mia. kr. innistandandi og +1,3 mia. kr. í útlánum í føroyskum bankum
- Vinnulívið: metstór avlop seinastu árini. Inntøkurnar frá partafelagsskatti øktar við 120 mió. kr. árliga.
- Talið av nýstovnaðum partafeløgum +800, herav íverksetarafeløg +210.
- Inntøkur landskassans øktar nærum 1,3 mia. kr., sum er tvífalt ríkisstuðulin
- Ríkisstuðulin er nú metlágur partur av samlaðu almennu inntøkunum. 94% av almennu inntøkunum eru skaptar í Føroyum, ríkisstuðulin bert 6%.

*Avlop og minkandi skuld*
Longu fyrsta árið í samgonguskeiðnum – árið 2016 – eydnaðist at venda 8 ára gongd við halli á fíggjarlógini til yvirskot. Frá 2008-2015 hevði landið um 3 mia. kr. í halli, og skuldin var støðugt vaksandi. Henda gongd er vend til, at avlop landsins væntandi verður um 1,4 mia. kr. samanlagt árini 2016-2019. Umleið 1/3 av avlopinum verður spardur upp í Búskapargrunni Føroya, meðan umleið 2/3 av avlopinum verða nýttir til at minka skuld landsins. Hetta – saman við fastfrysting av ríkisveitingini – hevur tryggjað vaksandi búskaparligt sjálvbjargni og sjálvræði.

*Javnari býti av virðunum*
Í 2016 varð skattalætti til lág- og miðallønt settur í verk. Hesin gav upp í 700 kr. meira at liva av hvønn mánað. Í húski við tveimum miðalinntøkum var talan um 1.400 kr. meira at liva av um mánaðin. Samstundis varð tøkugjaldið á alivinnuna hækkað og somuleiðis tilfeingisgjaldið í uppisjóvarvinnuni. Á henda hátt varð skattalættin fult fíggjaður, samstundis sum virðini vórðu javnari býtt. Í 2019 varð flati 40% pensjónsskatturin umlagdur til stigvaksandi pensjónsskatt úr 30% upp í 40%. Hetta er ein munandi skattalækking fyri lág- og miðallønt.

Fólkapensjónistar hava eisini fingið væl meira at liva av. Í fyrsta umfari við átøkum í 2016, og síðan í sambandi við pensjónsnýskipanina. Samanlagt er talan um, at ein stakur pensjónistur uttan aðra inntøku hevur 1.500 kr. meira at liva av um mánaðin eftir skatt í 2019 enn í 2015.

Eisini fyritíðarpensjónistar hava fingið meira at liva av við átøkum í 2016 og 2017. Ein fyritíðarpensjónistur á lægstu fyritíðarpensjón hevur nú umleið 2.200 kr. meira at liva av um mánaðin eftir skatt enn í 2015. Tey við miðal og hægstu fyritíðapensjón hava umleið 1.000 kr. meira at liva av um mánaðin eftir skatt í 2019 enn í 2015.

Eisini stakir uppihaldarar, smábarnafamiljur og lesandi hava fingið munandi fíggjarligan styrk við familjuískoyti, hægri barnafrádrátti og betringum í lestrarstuðli.

Ein smábarnafamilja við 3 børnum og inntøku undir 320.000 kr. um árið fær nú familjuískoyti á 36.000 kr. skattafrítt um árið.

Allar smábarnafamiljur við børnum undir skúlaaldri hava fingið 42% hægri barnafrádrátt. Hesin hækkaði úr 6.500 kr. í 9.200 kr. pr. barn.

Lestrarstuðulin bleiv hækkaður við 500 kr. um mánaðin í 2017, umframt at hann varð prístalsjavnaður í 2018. Eisini fáa lesandi á hægri útbúgvingum, og á styttri vinnuførleikagevandi útbúgvingum, nú studning í 12 mánaðir, í mun til 11 mánaðir frammanundan. Harumframt er barnastudningurin hækkaður, og lesandi við børnum hava nú møguleika fyri at fáa familjuískoyti.

Tað eru komin knapt 80 fleiri nýggj bústovnapláss til fólk við serligum avbjóðingum, og umleið 20 umlættingarpláss. Íalt eru knapt 100 fleiri nýggj bústovna- og umlættingarpláss, og fleiri eru ávegis. Talið av fólkum í tillagaðum ella vardum starvi er komið uppá 325.

Javnari býti av ríkidøminum styrkir samhaldsfestið, tí fleiri fáa lut í framgongdini, og hetta hevur eisini tryggjað, at virðini í størri mun eru komin í umfar og harvið hava skapt enn størri vøkstur og trivnað.

*Styrkt fíggjarligt støðufesti - Búskapargrunnur, Landsbanki og Váðaráð*

Frá 2017 fór Búskapargrunnurin at virka, og partur av avlopinum verður nú sett til síðis til verri tíðir. Ítøkiliga er talan um 20% av avlopinum upp til 200 mió. kr., og 50% av avlopinum oman fyri 200 mió. kr. Í ár væntast innistandandi í Búskapargrunni Føroya at fara upp um 500 mió. kr. Henda upphædd telur eisini við í minstagjaldføri landskassans.

Eisini er Landsbanki Føroya endurstovnaður, og eitt føroyskt váðaráð er farið til verka. Endamálið er at skapa størri fíggjarligt støðufesti og soleiðis styrkja samfelagið til at taka ímóti framtíðar niðurgangstíðum, ið av og á fara at koma – ikki minst í einum so lítlum búskapi sum tí føroyska. Til tess at javna inntøkurnar frá tilfeingisvinnunum, fara allar tilfeingisinntøkur frá ali- og fiskivinnuni nú í Búskapargrunn Føroya. Ein partur fer inn á fíggjarlógina, meðan ein partur verður støðlaður í grunninum og latin inn á fíggjarlógina yvir 7 ár. Hetta er konjunkturjavnandi og skapar støðufesti.

*Einar grønari Føroyar*

Føroyar skulu taka ábyrgd og ganga undan, tá umræður grønan umhvørvis- og orkupolitikk. Ferð er sett á at røkka málinum um 100% varandi orku á landi í 2030. Hetta eitt nú við at seta í verk stuðulsskipan, so allir borgarar lættari kunnu luttaka í orkuskiftinum. Øll avgjøld og allir skattir á el- og vetnisakførum eru tikin av, bæði skrásetingargjald, MVG og vegskattur. Tá umræður hitaskipanir til hús, ber til at fáa MVG afturborið. Tað almenna velur varandi orkukeldur til allar nýggjar almennar bygningar, og útboðið av oyggjaleiðum verður soleiðis, at tryggjað verður, at lagt verður um til grønari loysnir. Náttúrumargfeldnislógin er løgd fyri Løgtingið, og hevur henda til endamáls at verja og menna okkara ríku náttúru. Fyri framman liggja átøk at basa plastdálking, og at økja framleiðsluna av varandi orku.

*Fiskivinnunýskipan*

Samgongan arvaði gomlu og ótíðarhóskandi lógina um vinnuligan fiskiskap við ásetingini um, at loyvini vórðu uppsøgd 1. januar 2018, og við øllum tí ótryggleika hetta í mong ár hevði havt við sær fyri høvuðsvinnuna. Hóast stutt skotbrá hevur eydnast at fáa nýggju lógina um sjófeingi samtykta, og nýggja fiskivinnuskipan setta í verk frá 1. januar í 2018.

Eisini er nýggj lóg um veiðigjøld løgd fram á Løgtingi. Lógin skal koma í staðin fyri verandi skipan, har kilogjøld verða ásett politiskt á ein meira ella minni tilvildarligan hátt. Í nýggju lógini verða gjøldini ásett í mun til yvirnormala vinningin í einstaka fiskiskapinum. Hetta fer at tryggja eina meira rættvísa og vinnuvinaliga gjaldskipan. Partur av tilfeingisinntøkum landsins verður eisini settur av til stovnsetan av nýggjum fiskivinnugranskingarstovni, ið hevur til endamáls at virðisøkja ríkidømið meira.

*Pensjónsnýskipan*

Pensjónsnýskipanin varð eisini samtykt í 2018. Nýskipanin tryggjar, at allir verandi pensjónistar fáa minst 1.000 kr. um mánaðin meira at liva av eftir skatt, og at eisini teir framtíðar pensjónistar, ið ikki hava eina munandi inntøku umframt pensjónina, fáa minst 1.000 kr. meira um mánaðin. Pensjónsnýskipanin gerst nú meira smidlig og einføld, eitt nú við møguleikanum at velja at útseta tína pensjón og harvið fáa hægri pensjón, tá tú fert á pensjón, ella framskundaða pensjón, um tú ert slitin av arbeiðsávum. Somuleiðis er flati pensjónsskatturin nú umlagdur til stigvaksandi pensjónsskatt.

Pensjónsnýskipanin fer sum frálíður at betra munandi um haldførið í almenna búskapinum.

*Heilsunýskipan*
Menningarætlan er gjørd og sett í verk fyri heilsuverkið. Hetta merkir, at fleiri serlæknar eru settir, endurmenningin styrkt, og betri samskipan av heilsuverkinum. Endamálið er at veita eina enn betri heilsutænastu til føroyingar. Partar av menningarætlanini eru settir í verk, meðan aðrir verða settir í verk yvir eitt áramál. Fyri at betra tænastuna innan heilsuverkið er játtanin økt munandi til sjúkrahúsini. Samanlagt verður játtanin til rakstur av heilsumálum økt 25% frá 2015 til 2020.

*Tíðarhóskandi vinnukarmar*
Alivinnan hevur fingið meira varandi og tíðarhóskandi karmar við nýggjari lóggávu, ið varð samtykt í 2018. Málið er at tryggja, at vit framhaldandi hava eina lívfrøðiliga burðardygga og kappingarføra alivinnu.

Tørvur er á enn størri menning av innlendis ferðavinnuni, og er fíggjarorka og samskipandi eind sett av at skunda undir hetta. Filmshús er sett í verk, eins og afturberingarskipan til filmsframleiðslur í Føroyum, hetta fyri at stuðla undir menning av filmsvinnu í Føroyum.

Talgildu Føroyar fara hartil at skapa eitt framkomið talgilt undirstøðukervi í Føroyum, og fer hetta at leggja lunnar undir at kunna veita fleiri og betri tænastur, styrkja kappingarføri Føroya og stimbra KT-vinnuna.

*Barsilsskipan longd úr 38 upp í 48 vikur*
Tíðarskeiðið við útgjaldi úr Barsilsskipanini er longt munandi. Í 2017 við 6 vikum, í 2018 við 2 vikum, og í 2019 við 2 vikum afturat soleiðis, at komið nú er upp í 48 vikur. Harvið er tíðin við barsilsløn longd úr 38 í 48 vikur í samgonguskeiðnum. Málið er at røkka 52 vikur, og tað er nú nær.

*Fleiri útbúgvingar og fleiri lesandi*
Stórur dentur er lagdur á, at geva lesandi betri umstøður, hetta m.a. sum liður í at skapa ein varandi fólkavøkstur og størri sjálvbjargni. Talið av lesandi er tí økt. Á Fróðskaparsetrinum ganga nú umleið 1.250 næmingar í mun til 850 í 2015.

Hetta er m.a. orsakað av, at:
- Fleiri útbúgvingar eru settar á stovn á Fróðskaparsetrinum, og í ár verður nýggj bachelor útbúgving í løgfrøði sett á stovn, eins og hægri útbúgving innan list verður stovnsett.
- Fleiri eftirútbúgvingar á skúlaøkinum eru bodnar út.
- Ferðavinnuútbúging er sett á stovn í Vestmanna og listaútbúgving eins og háskúlatilboð innan vistgrøði á Sandi.
- Í Suðuroy er búskaparbreyt, og FHS er sett á stovn, nýgg hjálparfólkaútbúgv ávegis, umframt at Ítróttaháskúli og eftirskúli í Suðuroy eisini eru millum raðfestingar samgongunnar.

*Styrkt mentan*
Eitt ríkt mentanarlív er fyritreyt fyri, at vit í Føroyum skulu trívast og mennast sum land og fólk. Tí eru fleiri átøk framd, ið skulu betra umstøðurnar hjá mentanarlívinum í Føroyum:
- Nýtt Tjóðleikhús verður bygt í næstum. Lógaruppskot er lagt fyri Løgtingið.
- Mentanargrunnurin er øktur úr 6,2 mió. kr. upp í 10 mió. kr.
- Filmshús er latið upp eins og filmsgrunnurin hevur fingið økta játtan.
- Rocksavn í Klaksvík og skjalasavn á Tvøroyri eru raðfest.

- Føroyska málið, sum er ein av mentanar- og samleikaberum okkara, er raðfest eitt nú við meira undirvísingartilfari, barnasangbók til øll børn, og verður nú farið undir at fáa føroyska málið inn í fartelefon- og telduforrit.

*Betri bústaðamøguleikar*
Stóri fólkavøksturin hevur lagt trýst á bústaðamarknaðin. Stórur dentur er lagdur á at fáa fjøltáttað bústaðamarknaðin. Landsstýrið hevur tí gjørt ein bústaðapakka, sum fremur fleiri átøk fyri at økja um útboðið – bæði av privatum og almennum bústøðum – og fjøltátta bústaðamarknaðin. Mett er at tørvur er á minst 600 bústøðum afturat, umframt allar ætlanir, ið eru í gongd, bæði privat og alment. Bústaðapakkin hevði til endamáls at gera tað meira áhugavert hjá privatum at byggja í minsta lagi 2/3 av metta tørvinum, meðan tað almenna Bústaðir fær heimild at byggja 200 framskundaðar íbúðir afturat, samsvarandi við 1/3 av metta tørvinum.

Bústaðir hevur uml. 250 leigubústaðir í dag. Um 200 leigubústaðir afturat verða í løtuni bygdir, eins og um 200 eru ávegis at fara í gongd. Bústaðapakkin gevur hartil Bústaðir møguleikan at útskriva lánsbrøv við trygd í føstu ognunum hjá Bústøðum soleiðis, at byggjast kunnu um 200 bústaðir afturat omanfyrinevndu. Hetta fer samstundis at geva pensjónspengum møguleika at verða settir í føroysk – heldur enn útlendsk – realkredittlánsbrøv.
200 mió. kr. eru hartil settar av til at byggja nýggjar vardar bústaðir og bústovnar til fólk við serligum avbjóðingum.

*Økt sjálvræði og fleiri heimtøkur*
Ein av grundsúlunum í samgonguskjalinum er størri sjálvbjargni. Umframt at skapa størri búskaparligt sjálvræði, so er týðandi partur av hesum at fremja fleiri heimtøkur av málsøkjum, sum í dag eru undir útlendskum ræði.

Familjurættarliga økið er heimtikið í 2018, og hildið verður áfram í ár, har stig verða tikin til, at umsitingin av útlendingamálum og loftferðslu verða umsitin í Føroyum frameftir.
Eisini hava landsstýrið og samgongan sett sær fyri at heimtaka vitaverk, sjórættin, kortøkið (land- og sjókort), eins og ætlanin er at yvirtaka landslæknaembætið.

Uttanríkispolitiskt verður arbeitt miðvíst fyri at fáa betri handilsavtalur, vit hava fingið avtalur við Turkaland og Bretland, og áhaldandi verður arbeitt við at gagnnýta fleiri møguleikar hjá Føroyum í altjóða høpi.

## HØVUÐSMÁLINI FRAMEFTIR

Málið hjá samgonguni er at røkka einum meira samhaldsføstum, sjálvbjargnum og tíðarhóskandi Føroyum. Sum víst omanfyri, eru flestu høvuðsmálini, ið vórðu staðfest í samgonguskjalinum 14. september 2015, annaðhvørt rokkin, ella eru komin so væl ávegis, at tey eru komin í Løgtingið til støðutakan. Men arbeitt verður framhaldandi við at menna og tryggja samfelagið frameftir.

Niðanfyri verður greitt frá teimum høvuðsmálum, ið landsstýrisfólkini hava sett sær fyri at røkka restina av árinum og í 2020 og frameftir. Felags fyri hesi er, at tey skulu røkkast innan fyri ásetta játtanarkarmin. Til tess at at fremja ein varnan fíggjarpolitikk verður enn sum áður neyðugt við átøkum, ið tryggja, at hvør króna verður nýtt so skynsamt sum møguligt, og við átøkum, ið leypandi frígeva fíggjarliga orku til enn fleiri raðfestingar fyri framman.

## Løgmansfyrisitingin

Dátueftirlitið verður uppraðfest í sambandi við nýggja ES-fyriskipan um persónsupplýsingar.

## Fiskimálaráðið

Nýggj fiskivinnufyrisiting skal mennast, og Fiskiveiðieftirlitið skal framhaldandi styrkjast. Hetta verður raðfest í í kørmunum. Arbeiði innan stovnsmetingar og umsitingarætlanir skulu mennast, og tí verður eisini arbeiðið á Havstovuni raðfest. Við nýggja havrannsóknarskipinum verður arbeiðið við gransking, vitan og royndum um alt lív havsins eisini munandi styrkt.

KT-skipanir og regluverk verður ment av nýggjum í sambandi við fiskivinnunýskipanina innan økini umsiting av rættindum, loyvum og tilfeingisgjøldum.

Landsstýrið hevur stigvís ment eina skipan, eina "Matís-líknandi" skipan fyri nýskapan, menning og gransking innan fiskivinnuna, har endamálið er at virðisøkja fiskatilfeingi okkara í øllum liðum – "av grunni at munni". Skipanin byggir á menning av "deplum" kring landið, ið liggja so nær økjum, har vinnulig menning fer fram, sum til ber. Gjaldið er beinleiðis tengt at inntøkum frá uppboðssøluni av veiðirættindum. Higartil eru 13 mió. kr. settar í Fiskivinnugrunn, sum saman við hækkaðari játtan til Fiskivinnuroyndir skal bera hetta týdningarmikla átak. Í 2020 verða 10 mió. kr. settar afturat í Fiskivinnugrunnin.

Ein føroysk veðurtænasta verður nú skipað. Ein arbeiðsbólkur, mannaður við veðurfrøðingum og øðrum, hevur skrivað ávegis frágreiðing í oktober 2018. Endalig frágreiðing verður latin landsstýrinum á vári í 2019. Í ávegis frágreiðingini skrivar arbeiðsbólkurin, at við eini meirupphædd upp á góðar 3 mió. kr. árliga er møguleiki at fáa eina dagførda, útbygda og nøktandi føroyska veðurtænastu við betri og meira álítandi verðurforsagnum fyri allar Føroyar og føroysk áhugaøki, betri miðling og luttøku í kanningum og granskingum av veðri, verðurlagi og verðurlagsbroytingum til gagns fyri tað føroyska samfelagið.

Ein nýggjur føroyskur landbúnaðarpolitikkur er stigvíst mentur. Endamálið er, at vit á burðardyggum og vistfrøðiligum grundarlagi verða munandi meira sjálvveitandi og sjálvbjargin við dygdar landbúnaðarvørum – og eisini egnum fóðri til staðbundnar framleiðslur. 12 greið mál eru sett fyri, hvussu hetta verður rokkið í einum 10 ára skeiði. Útbúgving, royndir, gransking og menning innan økið er avgerandi fyritreyt, og tí verður játtanin til landbúnaðarøkið styrkt.

Landið hevur ábyrgdina av at standa fyri átøkum í samband við oljudálking á sjónum uttan fyri kommunumark. Landið hevur ikki útgerð til endamálið, og skipanir innan økið mega eisini styrkjast. Tí verður málið raðfest.

## Fíggjarmálaráðið

Fíggjarmálaráðið arbeiðir støðugt við at fremja ein skynsaman fíggjar- og búskaparpolitikk. Umframt arbeiðið við játtanarkørmum fyri komandi 5 árini, og við fíggjarlóg fyri komandi árið, so eru og verða m.a. hesi mál framd í 2019:

- Talgildu Føroyar - herundir talgildan samleika og borgaraportal til allar føroyingar
- Pensjónsnýskipan við pensjónsskattalætta til lág- og miðallønt og broyting av fløtum pensjónsskatti til stigvaksandi pensjónsskatt.
- Bústaðir heimild til at útskriva realkredittlánsbrøv við trygd í bústøðum. Heimild til at byggja um 200 nýggjar bústaðir.
- Varskógvaraskipan fyri starvsfólk í almennum starvi setast í verk
- Tjóðarroknskapur til og við 2017.
- El- og vetnisakfør avgjaldsfrítøku í 2 ár afturat, og Gatt-tollurin avtakast.
- Ljóðbøkur javnsettar við vanligar bøkur, tá umræður avgjøld.
- Nýggj arbeiðsmarknaðarhagtøl

Harumframt eru eitt nú hesi mál at fremja fyri framman í 2019 og 2020:

- Stovnseta Búskaparliga Forum Føroya
- Styrkja og skipa nettrygd (Cybersecurity)
- Lønardeildin mennast til starvsfólka- og lønardeild
- Betri og langtíðartryggjað tolleftirlit hjá TAKS
- Tjóðarroknskapur í føstum prísum
- Hagtøl fyri heimsmálini í Føroyum
- Sáttmálasamráðingar
- Fleiri dupultskattaavtalur við lond, ið vit hava samhandil við
- Gera fyrireikingar lidnar til heimtøku av fíggjarøkinum, so klárt er at taka støðu til málið. Hava heimtikið pensjón-, tryggingar- og realkredittpartin. Eftir er bankaparturin.
- Støðugt arbeiða við at gera føroyska búskapin fult sjálvbjargnan

## Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Vinnupolitiskt verða serliga útlendingaøkið og integrasjón umframt yvirtøkurnar av sjóuppmerking, vitaverki og sjórættinum raðfest komandi árið, men eisini verður hildið fram við at menna skapandi vinnugreinarnar.

Uttanríkispolitiskt verður sendistovan í fjareystri, sum væntandi letur upp í Beijing í summar, raðfest.

*<u>Útlendingamál og integrasjón</u>*
Umsitingin av útlendingamálum verður yvirtikin seinni í ár.

Føroyskir myndugleikar koma tá at taka avgerðir í

- málum, har útlendingur søkir um uppihaldsloyvi, grundað á tilknýti til familju (familjusamanføring),
- málum um arbeiðsloyvi, og
- málum um uppihaldsloyvi til lesandi, ítróttafólk o.a.

Við hesi yvirtøkuni verður bróðurparturin av teimum útlendingamálum, sum hava týdning fyri borgarar og vinnu í Føroyum, málsviðgjørd og avgjørd av føroyskum myndugleika.

Útlendingar, sum búleikast fast í Føroyum, eru eitt tilfeingi hjá føroysku tjóðini, og teir koma at dugna undir føroyska samfelagið, um rætt verður borið at. Tí er avgerandi, at nakað munagott verður gjørt á integrasjónsøkinum frameftir. Her verður serliga hugsað um at menna málsligu tilboðini til útlendingar. Uttan tilboð, ið kunnu menna málførleikar eins og mentanar- og samfelagsfatan, gera vit lættliga somu mistøkini, sum londini uttan um okkum, sum hava fingið týðandi samfelagsbólkar, sum ikki eru samskipaðir partar av vanliga sivila samfelagnum, felagslívi o.l.

Tí hevur landsstýrið eisini í sambandi við yvirtøkuna av útlendingaøkinum lagt stóran dent á, at útlendingalógin fær eitt ískoyti, soleiðis at varandi uppihaldsloyvi í Føroyum kann verða treytað av málførleikum og samfelagsinnliti.

*Yvirtøka av vitaverkinum og sjóuppmerking*
Lógaruppskot um at taka yvir sjóuppmerking og vitaverk frá 1. januar 2020 liggur í løgtinginum. Ein lítil deild undir danska Søfartsstyrelsen stendur fyri rakstrinum av størru vitunum í Føroyum, m.a. í Mykinesi, á Borðuni og í Akrabergi. Á deildini starvast 3 starvsfólk, og fáa hesi tilboð um at halda fram í starvi hjá tí stovni, sum eftir yvirtøkuna fer at umsita vitarnar.

*Yvirtøka av sjórættinum*
Í sambandi við yvirtøkuna av vitaverkinum varð komið eftir, at nú restaði bara sjórætturin, fyri at alt málsøkið trygd á sjónum er komið á føroyskar hendur. Tí setti landsstýrið sær fyri í vár, at sjórætturin skal takast yvir við virknaði frá ólavsøku 2020. Lógaruppskot um yvirtøku er í løtuni til viðgerðar í Løgtinginum.

Fyrireikingarnar til praktisku yvirtøkuna byrja longu í vár, tá ið landsstýrið í eykajáttan fer at seta pening av, soleiðis at dagførd sjólóggáva, umframt førleiki og arbeiðsorka at útskriva neyðug skjøl verður tøk frá fyrsta yvirtøkudegi.

*Álitið um skapandi vinnur sett í verk*
Við uppskotinum um Tónleikaútflutningsstovu, sum varð samtykt í Løgtinginum beint fyri jól, eru flestu tilmælini í álitinum um skapandi vinnur frá 2015 sett í verk. Hóast talan er um smáar upphæddir, so er ætlanin stigvíst at økja játtanirnar komandi árini.

Í 2020 verða játtanirnar til filmshúsið og tónleikaútflutningsstovuna nakað øktar. Tað sama verður gjørt við stuðulin til filmsvinnu.

*Sendistova í Beijing*
Í eina tíð hevur ætlanini verið at fara undir sendistovuvirksemi í fjareystri. Landsstýrismaðurin í uttanríkismálum hevur tikið avgerð um, at føroyska sendistovan í fjareystri verður staðsett í Beijing. Sendistovan byrjar væntandi sítt virksemi í summar.

## Almannamálaráðið

Við vælferðarpakkanum, ið varð lagdur fyri tingið fyrr í vár, er sjøtul settur á eitt nýtt kapittul í føroyskari sosiallóggávu, har allar tænastur í størri mun skulu skipast við tí endamáli at fáa fólk at fóta sær skjótari. Hetta verður gjørt eitt nú við at heimila Almannaverkinum at veita viðlíkahaldsvenjing umframt ta endurvenjing, sum stovnurin hevur ment seinastu árini. Fyri at styrkja verandi endurvenjingartænastu, fáa hana fult útbygda og fyri at tryggja, at teir borgarar, ið hava fingið umfatandi  endurvenjing  uttanlands og frá heilsuverkinum, verða loftaðir, er neyðugt at raðfesta hesar tænastur komandi árini.

Í einum nýmótans vælferðarsamfelagi við nógvum sergreinaðum tænastum er neyðugt at samskipa tænasturnar til borgarar við serligum tørvi. Við vælferðarlógini fær Almannaverkið eitt nú ábyrgd av at samskipa tvørgeiralig átøk til børn og ung við ymiskum avbjóðingum. Ætlanin er eisini miðvíst at víðka “góðu tilgongdina” til at fata um allar familjur, sum hava barn, ið ber brek, í árunum 2020-2023.

Tænasturnar verða frameftir í størri mun veittar við støði í tørvinum hjá tí einstaka og ikki út frá, hvørjar tænastur eru til taks. Tænastan á fyribils- og vardum bústøðum verður skipað sum grundtænasta, sum verður veitt øllum, og einstaklingarættað tænasta, sum verður veitt tí einstaka.

Ráðgevingarskyldan verður herd, og tí er eitt nú neyðugt at betra um heimasíðuna, so hon kann virka interaktivt sum brúkaraportalur. Neyðugt verður tí eisini við tillagingum av kt-skipanum í tænastuni, so betri hagtøl kunnu fáast til vega. Pensjónsnýskipanin fer eisini at virka frá 2020, og fer hetta at seta nýggj krøv til, hvussu Almannaverkið veitir sína tænastu til pensjónistarnar, eitt nú verður neyðugt at seta meira orku av til ráðgeving og útrokningarhættir. Eitt nú verður møguligt hjá verandi pensjónistum at velja, um inntøka hjá hjúnafelaga framhaldandi skal takast við í inntøkumetingina, tá pensjónin skal útroknast, ella øvugt, um tað bert er egininntøka, ið skal roknast við.

Fíggjarliga endurbótin verður við vælferðarlógini víðkað til eisini at fevna um avvarðandi av doyggjandi og fólki við seinheilaskaða, sum ikki fáa stovnsuppihald. Skipanin við hjálpartólum verður meira smidlig, og persónur, sum er í búfyriskipan sambært vælferðarlógini fara at hava sama rætt til hjálpartól sum persónur, ið býr í egnum bústaði. Eisini verður farið undir at fyrireika borgarastýrda stuðulstænastu (BPA).

## Heilsu- og innlendismálaráðið

*Heilsunýskipan*
Menningarætlan er gjørd og sett í verk fyri sjúkrahúsverkið. Hetta merkir fleiri serlæknar, styrkt endurmenning og eisini betri samskipan av sjúkrahúsverkinum. Endamálið er at veita eina enn betri tænastu til føroyingar. Partar av menningarætlanini eru settir í verk, meðan aðrir verða settir í verk yvir eitt áramál.

Fyri at styrkja verandi endurvenjingartænastu, fáa hana fult útbygda og fyri at tryggja, at teir borgarar, ið hava fingið umfatandi  endurvenjing  uttanlands og frá heilsuverkinum, verða loftaðir, er neyðugt at raðfesta endurvenjingina fíggjarliga.

Eisini hava landsstýrið og samgongan avgjørt at yvirtaka kortøkið (land- og sjókort), eins og ætlanin er at yvirtaka landslæknaembætið.

Fólkatalið økist, samstundis sum vit liva longur og útboðið av viðgerðum økist í hvørjum. Hetta leggur trýst á tænasturnar, og er tí áhaldandi neyðugt at gagnnýta samlaða tilfeingið so væl, sum til ber, og fremja tillagingar á heilsuøkinum fyri at røkka virksemisvøkstrinum.

Arbeitt verður áhaldandi við at tálma almenna útreiðsluvøksturin, og lagt verður upp fyri, at stovnar og stjórnarráð bera sín part av hesum.

*Menningarætlanin fyri sjúkrahúsverkið*
Arbeitt hevur verið áhaldandi við at fáa fleiri serlæknar og onnur heilsustarvsfólk og at menna sjúkrahúsini. Hetta hevur eydnast í ein stóran mun, tí fleiri serlæknar eru settir í starv seinastu árini. Ein heildarætlan fyri sálarheilsu í Føroyum er gjørd. Aðalendamálið er at tryggja, at øll við sálarsjúku fáa eina javnbjóðis, dygdargóða og trygga tænastu so tætt at gerandislívinum, sum til ber. Herundir verður arbeitt við at menna eina sálarfrøðiliga eind og onnur átøk í menningarætlanini.

Farið er undir at menna heilsuverkið. Orsakað av, at arbeiðið er sera víðfevnt og fjøltáttað, er tað skipað í pørtum. Fyrsti partur snýr seg um at fáa sett í verk Menningarætlanina fyri sjúkrahúsverkið. Í hesum sambandi verður dentur serliga lagdur á trý høvuðsøki. Tey eru:

- Sjúkrahúsverkið, sum ein organisatión
- Uppgávubýtið, viðgerðir og raðfesting og
- Útvega, varðveita og menna heilsustarvsfólk

Úrslitini av at samansjóða sjúkrahúsini síggjast aftur í, at tað nú eru fleiri ágóðar, sum vísa seg vegna samstarv. Hetta er t.d. innan ortopædiøkið, herundir skurðviðgerðir og innan røntgenøkið. Endurmenning er á øllum sjúkrahúsunum, býtt á serøki. Eisini er telemedisinska samstarvið ment.

*Menningarætlan fyri heilsutænastur í nærumhvørvinum*
Hildið verður fram við at menna heilsutænasturnar í nærumhvørvinum, herundir kommunulæknaskipanina. Ætlanin er, at størri partur av heilsuveitingunum til borgarar skal fara fram á heilsudeplunum í heilsuøkjum kring landið. Á heilsudeplunum fara at starvast viðkomandi heilsustarvsfólk.

*<u>Fólkaheilsa, gransking og menning - Fólkaheilsumyndugleiki</u>*
Arbeiðið við fólkaheilsu og fyribyrging av lívsstílssjúkum heldur áfram og eigur at fáa hægri raðfesting. Tað fyribyrgjandi arbeiðið verður framhaldandi styrkt millum annað við framhaldandi at styrkja tilboðini innan barna- & ungdómspsykiatri. Harumframt verður arbeitt víðari við at styrkja tilboðið til barnaheilsuna við at víðka um tænastuna frá heilsufrøðingum til børn og ung eitt nú at fáa fleiri vitjanir til 2-5 ára gomul børn. Eisini verður hildið áfram at taka læknar í útbúgvingarskipanina. Etiska ráðið er sett og er farið til verka. Harumframt verður arbeitt framhaldandi við at menna KT-skipanirnar innan økið.

Ætlanin er at fáa skipað ein part av virkseminum innan heilsuøkið í ein Fólkaheilsumyndugleika. Orsøkin er, at tað verður mett, at tørvur er á at fáa ein sterkan fakmyndugleika innan heilsuøkið í Føroyum, ið kann ráðgeva landsstýrinum, kommununum og almennum myndugleikum í heilsuspurningum. Ætlanin hevur verið at skipa ein Fólkaheilsumyndugleika, sum skal vera føroyski fakmyndugleikin á heilsuøkinum. Eftir ætlan skulu m.a. Fólkaheilsuráðið og Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu húsast hjá Fólkaheilsumynduleikanum. Harumframt er ætlanin at fáa Landslæknan undir føroyskt málsræði. Stovnurin kann tá, hava til uppgávu at veita holla

ráðgeving til landsstýrið, kommunur og almennar myndugleikar í heilsufakligum spurningum. Umframt hetta skal Landslæknin fremja eftirlit við heilsustarvsfólki og stovnum á heilsuøkinum.

*Náttúru-, umhvørvis- og orkuøkið*
Arbeiðið við grønari orku heldur áfram. Ætlanir eru gjørdar bæði viðvíkjandi framleiðsluni og á brúkarasíðuni, sum skulu tryggja okkum, at vit røkka málinum um at veita 100 % grøna orku á landi í 2030. Harumframt eru ítøkiligar ætlanir um at seta nýggja vindorku upp tey næstu tvey árini. Uppskot til nýggja náttúruverndarlóg er lagt fyri Løgtingið. Nýggja lógin er betur egnað til at verja náttúruáhugamálini í mun til ta menning og útbygging, sum alsamt fer fram á landi, sjógvi og framvið sjóvarmálanum. Samtíðis verður arbeitt við at seta náttúrufyrisiting í verk. Farast skal eisini undir at dagføra umhvørvisverndarlógina, eitt nú í mun til árinsmetingar av firðunum. Harumframt verða útoyggjar og náttúru- og umhvørvisvernd raðfest, herundir eisini RAMSAR-økini.

*Kort- og landmátingarmyndugleiki, herundir kort- og landmátingar og sjókort*
Avgjørt er at flyta myndugleikan undir føroyskt málsræði. Fyrsti partur verður yvirtikin 1. apríl í 2019, og seinni parturin, sum er sjókort, verður fluttur undir føroyskt málsræði 1. januar 2020. Frágreiðingar eru gjørdar, ið lýsa, hvussu økini verða fyrisitin í dag, altjóða samstarv, hvussu yvirtøkan ítøkiliga verður framd og framtíðar samstarv millum føroyskar og danskar myndugleikar.

*Landkort*
Ein føroyskur landkortsmyndugleiki skal grundleggjandi røkja hesar uppgávur:
- Geodesi og referansunet
- Landkort og topografi
- Altjóða samstarv og samskipan við aðrar myndugleikar
- Ráðgeving
- Staðarnøvn

*Sjókort*
Ein føroyskur sjókortsmyndugleiki skal grundleggjandi røkja hesar uppgávur:
- Sjóuppmáting og sjókortagerð
- Nautiskar fráboðanir og útgávur

## Samferðslumálaráðið

*Samferðsluætlan*
Eitt væl útbygt og vælvirkandi samferðslukervi er ein fyritreyt fyri menning og trivnaði. Samferðsluætlanin er dagførd, sum skal galda fyri tíðarskeiðið 2018-2030. Hon fevnir um vegakervið og um ferjurnar hjá Strandferðsluni. Føroyar skulu verða ein eind, har tað er skjótt, lætt og trygt at ferðast alla staðni.

Samferðsluætlanin er eitt haldgott grundarlag fyri at gera semjur um at reka, viðlíkahalda, og at gera skilagóðar íløgur í infrakervið, herímillum vegir, tunlar og brýr. Atlit verða eisini tikin til náttúru og ferðavinnu.

*Undirsjóvartunlar*
Arbeiðið við Eysturoyartunlinum gongur eftir ætlan, og verður borðað ígjøgnum í mai 2019. Tunnilin verður eftir ætlan tikin í nýtslu í 2020. Farið er undir Sandoyartunilin og verður hann eftir ætlan liðugur í 2024.

Við Vágatunlinum og Norðoyatunlinum og nú Eysturoyar- og Sandoyartunlunum verða 90 prosent av føroyingum knýttir saman í eitt veganet. Tað er eitt stórt framstig fyri føroyska samfelagið sum heild, vinnuliga, mentanarliga og fólksliga.

Arbeitt verður við málinum um ein Suðuroyartunil.

*Vegir*
Verklagslóg um Innkomuveg til Tórshavn, og verklagslóg um innkomuvegin (Fjøruvegin) í Runavík eru lagdar fyri Løgtingið.

Landsvegakervið veksur alsamt í vavi, fleiri krøv verða sett til trygd og dygd til vegagerð, tunnilsgerð, brýr, viðlíkahald og rakstur. Ásannast má, at viðlíkahaldstørvurin er stórur og eigur tí at verða raðfestur.

*Tunlar*
Tunnilslið verður skipað á Landsverki, sum skal bora tunlar til smærru bygdirnar, so langt játtanin røkkur á hvørjum ári. Fyrsti tunnil, sum verður gjørdur, er Dalstunilin, síðan Fámjinstunilin.

Sáttmáli um Hvalbiarfarleiðini er gjørdur við byggifelag, og verður nú farið undir vegagerð og tunnilsgerð. So skjótt Hvalbiartunnilin er boraður ígjøgnum, er ætlanin at fara undir tunlarnar Norður um Fjall.

*Strandferðslan*
Strandfaraskip Landsins skulu lúka landsins tørv á fólka- og farmaflutningi. Arbeitt verður støðugt vit at gera tænastustøði og umstøður stovnsins enn betri. Til dømis er ein bátur júst keyptur til at sigla á Hestleiðini.

Eitt eykaskip til Strandfaraskip landsins verður bygt nú, sum kann røkja allar farleiðir í Føroyum uttan Suðuroyarfarleiðina. Skipið verður liðugt um eitt ár.

Við eykaskipinum fer stovnurin at vera førur fyri at veita eina enn betri tænastu, hvat túratali, trygd, komfort og grønari rakstri viðvíkur. Báturin fer at ganga 20 míl við ferðafólki og kann bæði sigla upp á ravmagn og gassolju. 96 ferðafólk og tríggir persónbilar ella ein stórur bilur fara at rúmast umborð.

Føroysku ferjurnar lúka ikki dagsins krøv til ferðamannaskip. Eftir samferðsluætlanini er neyðugt at fara undir eina tilgongd at endurnýggja verandi ferjuflota. Nakrar fyrireikingar eiga at verða gjørdar.

Arbeitt verður við at javnseta ferða- og flutningskostnaðin.

*Arbeiðsmarknaðarmál*
Samferðslumálaráðið arbeiðir fyri at skapa ein rúmligan, mennandi, virknan og tryggan arbeiðsmarknað. Miðað verður eftir at styrkja Arbeiðseftirlitið næstu árini, fyri støðugt at betra

arbeiðsumhvørvið og brunatrygdina á øllum føroyskum arbeiðsplássum. Barsilsskipanin skal betrast soleiðis, at barsilstíðin stigvíst verður longd úr verandi 48 vikum upp í eitt ár.

## Mentamálaráðið

***Mentan, útbúgving og gransking***

Nýggj skipan fyri pedagogikumútbúgvingina fyri miðnámsskúlalærarar skal fáast at virka. Pedagogikumútbúgvingin skal fremjast í samstarvi við Fróðskaparsetur Føroya, og ein skipan er ment, sum bæði skal tryggja, at miðnámsskúlalærarar fáa hesa lógarkravdu útbúgving, og sum er í samsvari við galdandi rammuavtalu við Danmark um góðkenning av miðnámsútbúgvingum.
Harafturat skulu tillagingar gerast í verandi breytaskipan m.a. sambært eftirmetingini, sum er gjørd.

Í samstarvi við vinnuna skal áherðsla leggjast á yrkisútbúgvingar og vinnurættaðar útbúgvingar í mun til tillagingar og samskipan, so tær áhaldandi samsvara við tørvin hjá vinnuni og samfelagnum annars. Lestrar- og yrkisvegleiðing fyri vaksin eins og førleikameting verða raðfest sum grundarsteinar í eini komandi vaksnamannaútbúgvingarskipan.

Gongd verður sett á arbeiðið at fáa enn meiri sjálvstøðuga útbúgvingarskipan og at fáa skipanir fyri viðurkenning og góðkenning av teimum føroysku útbúgvingunum. Talan er um føroyskan førleikakarm (NQF), um BOLOGNA, ERASMUS v.m., umframt at dentur áhaldandi skal leggjast á útbúgvingarlig og granskingarlig samstørv millum lond.
Samstarvið við Fróðskaparsetur Føroya um m.a. fleiri hægri útbúgvingar eins og gransking í Føroyum heldur fram, og saman við Granskingarráðnum verða ætlanir og raðfestingar fyri gransking viðgjørdar.

Nám og Próvstovan verða raðfest, so ferð kann koma á at geva út føroyskt tilfar til miðnám og at styrkja námsráðgevingina, eins og at gera próvtøkuuppgávur í Føroyum og á føroyskum. Stórur tørvur er eisini á at menna kt-umsitingarskipan fyri alt tað føroyska skúlaverkið, og størri dentur skal leggjast á fólkaskúlan í mun til at gagnnýta serútbúnu lærararnar betur og framhaldandi raðfesta neyðugar eftirútbúgvingar.

Í samstarvi við kommunurnar verður hugt nærri at, hvussu musikkskúlaskipanin kann raðfestast við atliti at betri atgongd fyri børn og ung, at samstarvi, førleikamenning, átøkum v.m. Í hesum sambandi verður eisini ein møgulig listaskúlaskipan viðgjørd.
Harafturat verður samstarvað meira við kommunurnar og Fróðskaparsetur Føroya um pædagogiska økið, um yvirskipaðu endamálini, um útbúgving og eftirútbúgving og onnur átøk at menna serliga námsfrøði til barnaøkið.

Í Føroyum var málmenningarár í fjør, har serligt fokus var á málmenning hjá børnum. Arbeiðið at styrkja føroyska málið heldur fram, og fær hetta arbeiði tí eisini serliga raðfesting frameftir. Fokusøkið fevnir um "føroyskt sum annaðmál", har verkætlan verður ment at lyfta undirvísingina, at gera undirvísingartilfar, at seta á stovn útbúgving fyri undirvísarar og at menna politikk. Samstarvað verður við Uttanríkis- og vinnumálaráðið og Útlendingastovuna, sum seta samsvarandi fíggjarorku av, um hesa verkætlan.

Harafturat fevnir fokusøkið um at styrkja m.a. móðurmálsorðabókina við orðtøku og tøkniligari røkt, at raðfesta høgt máltøkniverkætlanina "Føroyskt á talgildum brúkaramótum og øðrum tøkniligum mótum", og um at fíggja fleiri týðingar av góðum heimsbókmentum til føroyskt,

sum m.a. er partur av landsumfevnandi átøkum fyri lesing, og at týða føroyskar bókmentir til onnur mál. Málráðið fær í hesum sambandi eisini hægri játtan, so orka verður til m.a. strategiskt arbeiði, kanningar og samskifti við ymisku samfelagsgeirarnar og viðkomandi stovnar.

Á mentanarøkinum er stevnumiðið greitt: Vit skulu styrkja livandi mentanina og listina, bæði við íløgum og játtanum til tjóðarbyggjandi stovnar og allar skipanir til mentanarhús, søvn og mentanarligt/listarligt virksemi kring alt landið. Í fíggjarkørmunum verða m.a. hesi øki styrkt:

- Mentanargrunnurin
- Tónleikur og sangur (harundir Symfoniorkestrið og onnur orkestur)
- Leiklistin
- Filmur
- Føroyski dansurin
- Ítrótturin og altjóða landsliðsarbeiði

Á savnsøkinum er ætlanin at raðfesta bygdasøvnini og fólkabókasøvnini, umframt at fyrisitingin av UNESCO sáttmálanum, sum Løgtingið hevur samtykt at seta í gildi, skal fáast í trygga legu. Varðveiting av talgildum savnum, sum Tjóðskjalasavnið varðar av, verður framhaldandi raðfest. Á Tjóðsavninum verður framsýningarparturin raðfestur og Landsbókasavnið tørvar nýggja bókasavnsskipan.

## Játtanarkarmar 2020: 501 mió. kr. í avlopi og íløgur kring landið

Í játtanarkørmunum fyri 2020 er samlaða úrslitið (RLÚ 1) 501 mió. kr. Íroknað hesum eru 428 mió. kr. í íløgum. Harvið er rakstrarúrslitið áðrenn íløgur 929 mió. kr.

Rakstrarútreiðslurnar hækka úr 4.840 mió. kr. í 2019 í 5.011 mió. kr. í 2020. Tað er ein vøkstur á 3,5%.

Hesir játtanarkarmar fyri 2020 eru grundaðir á málið um at fremja ein skynsaman fíggjar- og búskaparpolitikk saman við ynskjunum um at fremja fleiri átøk og uppraðfestingar. Hetta setir krøv til landsstýrið og samgonguna um at fremja fleiri átøk, ið tryggja, at tænasturnar hjá landinum verða riknar so skynsamt sum møguligt, og at fremja nýskipanir og tillagingar, ið skulu tryggja best møguliga tænastu innan játtanarkarmarnar.

### Íløgur kring alt landið

Íløgukarmurin verður 428 mió. kr. í 2020. Árini 2021 til 2024 verður íløgukarmurin árliga millum 427 og 459 mió. kr.  Framgongdin er ikki eins stór í øllum pørtum av landinum. Tí er dentur lagdur á at gera íløgur kring alt landið fyri at tryggja, at framgongdin í búskapinum í størst møguligan mun kemur øllum samfelagnum til góðar.

Størstu íløgurnar hjá landinum í tíðarskeiðnum fyri 5-ára játtanarkarmarnar (2020-2024) eru:

*Útbúgving og mentan*
- Miðnám á Kambsdali
- Húsarhaldsskúli í Klaksvík
- Eftirskúli og Ítróttaháskúlin í Suðuroy
- Listaskúli á Sandi
- Fróðskaparsetur
- Rásin

*Mentan*

- Tjóðleikhús
- ÍSF hús
- Søvn Landsins
- Listasavn Føroya
- Víkingaskip í Hovi
- Skótadepil á Selatrað

*Heilsuverk*

- Landssjúkrahúsið
- Klaksvíkar sjúkrahús

*Almannaøkið*

- Bú- og umlættingardepil til fólk við autismu
- Tríggir nýggir bústovnar til fólk við menningartarni
- Nýtt barnaheim
- Eirargarður endurnýggjaður

*Undirstøðukervið*

- Eysturoyar- og Sandoyartunlar, saman við innkoyringarvegum
- Hvalbiartunnilin og síðan Tunlarnir Norður um Fjall. Gøtudalstunnil og Vestmannatunnil á skrá eftir hetta.
- Tunnilstoymi hækkandi játtan í 20 mió. kr. árliga – fyrst Dalstunnilin og síðan Fámjinstunnilin. Tjørnuvík og Gjógv á skrá eftir hetta.
- Hækkandi játtan til viðlíkahald – bæði vegir, tunlar, brýr og bygningar

*Aðrar størri íløgur*

- Talgildu Føroyar
- Havrannsóknarskip
- Nýggj hølir til Sjóvinnustýrið vesturi í Vágum

**Fortreytir fyri framrokning av útreiðslum**

Útreiðslumálið er grundað á framrokningar av lógarbundnum játtanum, og bundnar raðfestingar eru gjørdar fyri árini 2020 til 2024. Fólkavøkstur og broytt fólkasamanseting leggja trýst á almennu útreiðslurnar.

Í framrokningunum er lagt upp fyri bundnum raðfestingum næstu árini, alt íroknað. Eisini er krav um effektivisering av almenna geiranum lagt inn í framrokningarnar.

Sum vanligt er í játtanarkørmunum, verður framroknað í ársins prísum í 2020, men árini 2021-2024 eru framroknað í føstum prísum. Tað merkir, at frá 2021 til 2024 er ongin lønar- ella prísvøkstur íroknaður.

Flestu almennu lønarsáttmálar eru galdandi til 1. oktobur 2019. Lønarvøksturin eftir hetta er tí ein óvissa. Tørvurin á átøkum, herundir møguligum lógarbroytingum, til tess at halda játtanarkarmin fyri 2020 verður greiður, tá lønarsáttmálar eru gjørdir fyri samlaða almenna arbeiðsmarknaðin, galdandi fyri árið 2020.

Játtanarkarmarnir eru gjørdir við verandi rentustøði og oljuprísum. Hetta er ein óvissa í játtanarkørmunum, tí rentustøðið og oljuprísurin kunnu broytast, og harvið kunnu útreiðslur landskassans til rentustuðul, rentuútreiðslur av skuldini, og útreiðslur til olju eisini broytast.

Íløgukarmurin verður 428 mió. kr. í 2020, 457 mió. kr. í 2021, 427 mió. kr. í 2022, 450 mió. kr. í 2023, og 459 mió. kr. í 2024.

Eins og undanfarnu árini eru í íløgukarminum eisini innroknaðar íløgukendar útreiðslur. Í 2020 er talan um 50 mió. kr. í partapeningi til felagið Eystur- og Sandoyartunlar, 20 mió. kr. til verkætlanina Talgildu Føroyar, og 11 mió. kr. tilsamans til løgukendan stuðul til sjálvsognarstovnar og kommunur, hóast hesar í játtanarskipanini eru ávikavist stuðuls- og rakstrarjáttanir.

**Fortreytir fyri framrokning av inntøkum**

Inntøkumál landsstýrisins er 5.940 mió. kr. Fortreytin fyri hesum málið er, at vøksturin í inntøkunum frá skattum og avgjøldum frá 2018-2019, verður hin sami, sum frá 2017 til 2018.

Inntøkurnar í 2018 eru í fyribilsroknskapinum umleið 5.500 mió. kr. Millum annað vaks landsskatturin við yvir 10% ella oman fyri 150 mió. kr.

Higartil í 2019 er stórur vøkstur á serliga landsskattinum (+17%) og meirvirðisgjaldinum (+14%) vegna økt virksemi í landinum. Hesin vøkstur er munandi størri enn sama tíðarskeið í fjør. Landsstýrið metir, at um landsskatturin verður framskrivaður við lægri samlaðum vøkstri enn í fjør, samstundis sum MVG verður framskrivað 4% fyri restina av árinum, so mett verður tí, at inntøkumálið fyri 2020 kann røkkast uttan nýggj inntøkuátøk.

Fyritreytin fyri, at náa inntøkum á 5.940 í 2020 er, at inntøkur landskassans í 2019 økjast samanlagt 5%, og 2,9% í 2020. Til samanberingar øktust inntøkur landskassans samanlagt 22% frá 2015 til 2018.

Á teimum skatta- og inntøkujáttanum, har hetta verður hildið vera neyðugt, eru gjørdar serstakar metingar út frá fortreytunum fyri játtanini. Til dømis væntast vanligur landsskattur og MVG at økjast við 3,5% í 2020.

Sum vanligt er í játtanarkørmunum verður framroknað í ársins prísum í 2020, men árini 2021-2024 er framroknað í føstum prísum. Tað merkir, at frá 2021 til 2024 er framskrivað við realum inntøkuvøkstri. Framskrivað er við 2% árliga í inntøkuvøkstri frá 2021 til 2024. Verður inntøkuvøksturin minni enn hetta, verður neyðugt við átøkum fyri at røkka fíggjarpolitisku málunum.

**Uppskot til játtanarkarmar 2020-2024**

Uppskotið til játtanarkarmar byggir á fíggjarlógina fyri 2019, umframt politiskar semjur og avtalur, sum eru gjørdar síðani.

Í talvuni niðanfyri er uppskotið til játtanarkarmar fyri árini 2020 til 2024 útgreinað og býtt á greinar og ár.

**Talva: Útgreinaðir játtanarkarmar fyri 2020-2024**

| *Mió. kr.* | ***FL2019*** | **2020** | **2021** | **2022** | **2023** | **2024** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur, §1-§17: | | | | | | |
| § 1 Løgtingið | *64,2* | 61,5 | 60,8 | 61,1 | 63,4 | 62,7 |
| § 2 Løgmansfyrisitingin | *40,0* | 40,3 | 40,6 | 40,8 | 41,4 | 41,1 |
| § 3 Fíggjarmál | *321,2* | 333,5 | 341,1 | 348,7 | 356,3 | 363,9 |
| § 5 Fiskivinnumál | *174,2* | 177,9 | 177,9 | 177,9 | 177,9 | 177,9 |
| § 7 Mentamál | *1.120,2* | 1.139,7 | 1.156,6 | 1.155,0 | 1.160,2 | 1.164,5 |
| § 11 Heilsu- og innlendismál | *1.191,5* | 1.266,9 | 1.290,6 | 1.315,2 | 1.340,6 | 1.367,1 |
| § 12 Almannamál | *1.556,2* | 1.601,9 | 1.630,2 | 1.654,9 | 1.682,2 | 1.710,2 |
| § 13 Uttanríkis- og vinnumál | *117,3* | 130,3 | 130,3 | 130,3 | 130,3 | 130,3 |
| § 17 Samferðslumál | *254,8* | 259,4 | 259,4 | 259,4 | 259,4 | 259,4 |
| **Rakstrarútreiðslur tilsamans** | ***4.839,7*** | **5.011,4** | **5.087,4** | **5.143,2** | **5.211,8** | **5.277,1** |
| | | | | | | |
| **Íløguútreiðslur, §1-§17*** | ***441,7*** | **428,0** | **457,1** | **426,5** | **450,2** | **458,6** |
| | | | | | | |
| **Rentuútreiðslur, netto**** | ***4,7*** | **6,8** | **7,2** | **5,8** | **5,9** | **5,9** |
| | | | | | | |
| **Inntøkur** | ***5.663,1*** | **5.946,8** | **6.065,7** | **6.187,1** | **6.310,8** | **6.443,3** |
| | | | | | | |
| **RLÚ-úrslit** | ***377,0*** | **500,6** | **514,1** | **611,6** | **642,9** | **701,7** |

**Viðm:** Tølini fyri 2019 og 2020 eru í leypandi prísum, og tølini fyri 2021-2024 eru í føstum prísum. Tað vil siga, at lønar- og prísvøkstur er ikki íroknaður, hvørki á útreiðslu- ella inntøkusíðu landskassans. Tølini fyri 2019 eru sambært samtyktu fíggjarlógini.

* Í íløgukørmunum eru innroknaðar íløgukendar útreiðslur. Í 2020 er talan um 50 mió. kr. í partapeningi til felagið Eystur- og Sandoyartunlar, 20 mió. kr. til verkætlanina Talgildu Føroyar, og 11 mió. kr. tilsamans til íløgukendan stuðul til sjálvsognarstovnar og kommunur

** Rentuútreiðslur, netto er samanseting av rentuútreiðslum av lánsbrævaskuld landskassans og rentuinntøkum av gjaldføri landskassans.

## Tilmæli viðvíkjandi kommununum

Kommunurnar eru tilsamans umleið ein triðingur av almenna geiranum. Harvið eru kommunurnar týðandi partur av almenna búskapinum og av búskapinum sum heild. Skulu Føroyar hava fullgóða búskaparstýring, er tí neyðugt, at land og kommunur samskipa fíggjarpolitikkin í størri mun. Hetta hevði tryggjað, at land og kommunur í størri mun høvdu kunnað sett í verk neyðug átøk at tryggja eina støðuga búskapargongd.

Kommunalu roknskapirnir fyri 2018 eru ikki endaligir enn, men fyribils verður mett, at kommunali raksturin er vaksin til áleið 1,85 mia. kr., ið er umleið 5 prosent meir enn í 2017. Hetta er væl meira, enn játtanarkarmarnir hjá landinum løgdu upp til. Sambært samtyktu fíggjarætlanunum kann roknast við, at kommunalu rakstrarútreiðslurnar aftur í ár vaksa við umleið 5 prosentum.

Mett verður, at hesin útreiðsluvøksturin er ov høgur. Tí verður mælt til, at kommunurnar, tá ið tær fara undir arbeiðið við fíggjarætlanunum fyri 2020, leggja seg eftir, at rakstrarútreiðslurnar ikki vaksa við meira enn teimum 3,5 prosentunum, ið játtanarkarmarnir hjá landinum leggja upp til.

Fyri nøkrum árum síðani var árliga støðið á kommunalu løguútreiðslunum nakað niðanfyri 400 mió. kr. Í 2016 vuksu løguútreiðslurnar tó til 486 mió. kr., í 2017 til 518 mió. kr. og í 2018 fara tær at tátta í 700 mió. kr.

Sambært samtyktu fíggjarætlanunum fyri 2019 ætla kommunurnar at gera løgur fyri 725 mió. kr. Íroknað óbrúktar játtanir, ið vanliga verða endurjáttaðar, tá ið roknskapurin fyri farið ár er uppgjørdur, verða kommunalu løgujáttanirnar tí helst omanfyri 1,1 mia. kr. í 2019. Hetta verður sostatt triðja árið á rað, at samlaðu løgujáttanirnar hjá kommununum vera omanfyri 1 mia. kr.

Seinnu árini hava kommunurnar vanliga ikki brúkt samlaðu løgujáttanina, og soleiðis verður helst eisini í 2019. Sambært upplýsingum, ið Búskaparráðið hevur fingið frá kommununum, kann tó roknast við løguútreiðslum í 2019 fyri umleið 800 mió. kr. Helst kann eisini roknast við løgum fyri líknandi upphædd í 2020.

Eftir fáum árum er talan um tvífalding av løguútreiðslunum og mett verður, at støðið í dag er ov høgt. Mælt verður tí til, at kommunurnar samanlagt seta sær fyri at fáa løguútreiðslurnar niður aftur á eitt støði, sum liggur um 400 mió. kr. árliga.

**Bjálva og brynja Føroyar til framtíðina**

Føroyar hava flutt seg langt framá seinstu árini. Málið er framhaldandi, at røkka einum enn meira sjálvbjargnum, samhaldsføstum og tíðarhóskandi Føroyum, og at brynja føroyska samfelagið til framtíðar avbjóðingar.

Hetta mál skal røkkast saman við varnum fíggjarpolitikki og skynsomum búskaparpolitikki, ið bjálvar landið búskaparliga til framtíðina. Játtanarkarmarnir fyri 2020 leggja fíggjarligar lunnar undir, at hildið verður áfram at flyta Føroyar framá.

**Skjal hjálagt**

Skjal 1: Búskaparfrágreiðing I, mars 2019

Fíggjarmálaráðið, 26. mars 2019

Kristina Háfoss

landsstýriskvinna í fíggjarmálum

/ Bjarni Askham Bjarnason

## Inngangur

Sambært § 8 í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan skal frágreiðing (Búskaparfrágreiðing I), sum lýsir og metir um búskaparstøðu Føroya, harímillum tann almenna geiran, verða løgd við uppskotinum til løgtingssamtykt um játtanarkarmar. Uppskotið til løgtingssamtykt um játtanarkarmar fyri fíggjarlógina næsta ár skal leggjast fram fyri 1. apríl.

Uppskotið til játtanarkarmar er gjørt við støði í fíggjarpolitisku málunum og samgonguskjalinum hjá samgonguni. Uppskotið til løgtingssamtykt um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2020 byggir í høvuðsheitum á samtyktu løgtingsfíggjarlógina fyri 2019 (løgtingsmál nr. 47/2018), men nýggjar framrokningar eru gjørdar av inntøkum og útreiðslum.

Frágreiðingin er sett soleiðis saman, at fyrst er stutt lýsing av gongdini í føroyska búskapinum, síðani av altjóða búskapinum og at enda av almenna búskapinum.

## Lýsing av gongdini í búskapinum

Stór framgongd og vøkstur hava verið í føroyska búskapinum sjey ár á rað. Bruttotjóðarúrtøkan (BTÚ) vaks sambært metingum um 9% í 2016 og helst nakað minni í 2017 og 2018 (mynd 1). Hagtøl og lyklatøl benda á, at vøksturin stendur við í 2019, tó at búskaparvøksturin helst er vorðin meiri vanligur, um 3-4% um árið í ársins prísum. Uppgerðir av lønargjaldingum og onnur lyklatøl benda greitt á, at framgongdin stendur við fyrstu mánaðirnar í 2019.

Alt bendir sostatt á, at føroyski búskapurin framvegis er í hákonjunkturi. Fíggjarmálaráðið roknar kortini við, at vøksturin verður á einum meiri vanligum støði í 2019 og 2020 sammett við til dømis árini frá 2013 til 2016. Fíggjarmálaráðið roknar við, at stóri búskaparvøksturin síðstu 4-5 árini, sum frálíður, fer at hæsa nakað av og at vøksturin verður á einum meiri vanligum støði næstu 1-2 árini. Fleiri orsøkir eru til hetta, eins og greitt verður frá niðanfyri.

**Mynd 1**

**Bruttotjóðarúrtøka í ársins prísum, broyting í % um árið, 1999-2019**




Viðm.: Tølini fyri 2016 til 2019 eru metingar og forsagnir og skulu lesast við fyrivarni.

Kelda: Metingar og forsagnir frá Hagstovuni og Búskaparráðnum.

Mynd 1 omanfyri vísir gongdina í bruttotjóðarúrtøku (BTÚ) árini 1999 til 2015 og metingar fyri árini 2016 til 2019. Føroyski tjóðarroknskapurin er gjørdur upp fram til 2015. Tølini fyri 2016 til 2019 eru metingar og forsagnir. Mett verður, at føroyski búskapurin vaks um 9% í 2016 og nakað minni í 2017. Fíggjarmálaráðið roknar við vøkstri á 3-4% í 2018 og 2019 (tølini eru øll í ársins prísum).

Framgongdin í búskapinum síðani 2013 er millum annað komin av serligum umstøðum í alivinnuni og uppsjóvarvinnuni og av lágum rentustøði. Harafturat hava land, kommunur og vinnufyritøkur gjørt nógvar og stórar íløgur, sum hava stimbrað búskapin. At enda hava oljuprísir verið skiftandi, og lágir oljuprísir hava eisini stimbrað búskapin, serliga í 2016 og 2017.

Samanumtikið eru útlit fyri framhaldandi búskaparvøkstri næstu 1-2 árini, tó at vøksturin sannlíkt verður á einum meiri vanligum stigi serliga sammett við í 2016 og 2017. Roknast kann við, at ískoytið til vøksturin frá útflutningsvinnunum hækkar nakað í 2019 sammett við í 2018. Tøkan av aldum laksi er mett at hækka 5-10% í 2019. Óvist er, hvussu miðalprísir á aldum laksi vera í 2019, men stórar príslækkingar eru ikki sannlíkar í løtuni. Higartil í ár hevur gongdin í prísunum á aldum laksi verið nakað tann sama sum í 2018, og miðalprísir eru hækkaðir nakað frá januar til mars í ár.

Síðstu árini er munandi ískoyti til vøksturin komið av privatum og almennum íløgum. Roknast kann eisini við nógvum almennum og privatum íløgum næstu 1-2 árini. Hesar íløgurnar fara væntandi at stimbra búskapin næstu 1-2 árini.

Húsarhaldini í Føroyum eru sum heild væl fyri, og hava ikki nógva skuld sammett við húsarhald í øðrum framkomnum londum. Hetta saman við lágum rentustøði og hækkandi reallønum næstu 1-2 árini talar fyri, at privata nýtslan framhaldandi fer at vaksa næstu árini. Síðstu 3-4 árini er privata nýtslan vaksin støðugt og spakuliga. Fíggjarmálaráðið roknar við, at privata nýtslan fer at stimbra búskapin nakað næstu 1-2 árini.

Gongdin í botnfiskaveiðuni á landgrunninum hevur verið vánalig í fleiri ár. Tekin síggjast nú um, at fiskiskapurin aftur er batnandi. Nevnt kann verða, at sambært Havstovuni var gróðurin á Landgrunninum sera góður í 2017. Væl var av nebbasild, bæði í yngulkanningunum og í magakanningunum av toski og hýsu. Í 2018 var tó minni gróður, og eisini vísti yngulkanningin, at minni var av nebbasild sammett við í 2017.

Havstovan metir, at tilgongdin av toski og hýsu á Landgrunninum er batnað, og síðsta stovnsmeting bendir á, at báðir 2016-árgangirnir eru beint oman fyri miðal og at 2017-árgangirnir eru væl omanfyri miðal. Báðir stovnarnir eru nú komnir upp um markið, har serlig verjutiltøk eru neyðug, og kunnu umsitast sum vanligt. Báðir stovnarnir eru í vøkstri, og væntandi fer vøksturin at halda fram í 2019.

*Fleiri óvissur eru fyri komandi 1-2 árini*

Fleiri óvissur eru, sum kunnu ávirka búskapargongdina í 2019 og 2020. Ein óvissa er, at Bretland eftir ætlan fer úr ES-samstarvinum í 2019. Enn er ikki greitt, hvat samband verður millum ES og Bretland eftir, at Bretland er farið úr ES, millum annað á handils- og fiskivinnuøkinum. Heldur ikki er greitt, um Bretland verður partur av evropeiska felagsmarknaðinum og í tollsamgongu við ES í framtíðini. Fyribils er dagurin, tá ið Bretland fer úr ES, fluttur til 12. apríl ella til 22. mai í ár.

Verður talan um eina óskipaða og trupla tilgongd, fer hetta at ávirka búskapargongdina í øllum Evropa og óivað eisini í Føroyum næstu árini. Higartil hevur verið torført hjá bretsku stjórnini at gera handilsavtalur við lond uttanfyri ES í sambandi við at Bretland eftir ætlan fer úr ES.

Verður torført at semjast um handilsavtalur og aðrar avtalur millum ES og Bretlandi, millum annað um tollsamgongu og felagsmarknaðin, kann roknast við, at hetta fer at ávirka vøksturin og hugin at gera íløgur í Bretlandi og Evropa.

Um 10% av føroyska útflutninginum eru síðstu árini farin til Bretlands (mynd 6A). Tí kann tað eisini ávirka føroyska búskapin, um til dømis stígur kemur í búskapin í Bretlandi ella um virðið á bretska pundinum lækkar munandi. Hóast landsstýrið hevur undirritað handilsavtalu við Bretland, sum kemur í gildi, tá ið Bretland fer úr ES, kunnu aðrar óbeinleiðis ávirkanir hugsast at vera á føroyska búskapin og á øll londini í ES.

Eisini kann verða nevnt, at altjóða rentustøðið er framvegis søguliga lágt. Flestu búskaparfrøðingar rokna við, at rentustøðið, sum frálíður, fer at hækka til eitt vanligari støði. Í løtuni bendir kortini lítið á, at rentustøðið fer at hækka stórvegis í 2019, hóast torført er at meta um hetta. Stígur tykist vera komin í flestu av stóru búskapunum í ES, og hetta fer sannlíkt at merkja, at evropeiski miðbankin ikki hækkar renturnar í bræði.

Ein onnur óvissa er um altjóða oljuprísirnir. Oljuprísir lækkaðu munandi annað hálvár í 2018, men í løtuni eru oljuprísirnir hækkandi aftur.

*Tekin um fløskuhálsar, men ovhiting sæst ikki í búskapinum*

Fíggjarmálaráðið metir ikki, at til ber at staðfesta við vissu, at føroyski búskapurin er ovhitaður ella at somikið nógv ferð er á búskapinum, at gongdin ikki er haldfør. Til tílíkar staðfestingar krevjast hagtøl og vitan um búskapin, sum ikki eru tøk, til dømis uppgerðir av tjóðarroknskapinum í føstum prísum.

**Mynd 2**

**Inn- og útlán til húsarhald og vinnufeløg, føroyskir peningastovnar, mia. kr., sept.-2013 til jan.-2019**




Viðm.: Nettoinnlánini í *mynd B* eru innlán frá húsarhaldum frádrigin útlán til húsarhald í *mynd A*.
Kelda: Hagstovan.

Trupulleikarnir av fløskuhálsum, sum síggjast í løtuni, tykjast vera avmarkaðir til ávísar vinnugreinar (til dømis byggivinnan), ávísar marknaðir (til dømis sethúsamarknaðin) og møguliga til ávís øki í landinum heldur enn at ávirka búskapin sum heild.

Fyritøkur í summum vinnugreinum siga til dømis frá, at teimum vantar arbeiðsmegi, skulu tær framleiða meira og økja um virksemið. Sambært konjunkturkanningini hjá Hagstovuni siga um tríggjar av fýra fyritøkum í byggivinnuni, at mangul á arbeiðsmegi er størsta avmarkingin fyri at økja meira um framleiðsluna.

Í tílíkum umstøðum gagnar tað føroyska búskapinum, at fyritøkur kunnu innflyta arbeiðsmegi, tá ið torført er at fáa hendur á henni. Hetta tekur nakað av trýstinum av arbeiðsmarknaðinum og minkar um vandan fyri, at fløskuhálsar taka seg upp.

Ógvisligur útlánsvøkstur sæst ikki í landinum (mynd 2). Síðsta árið eru bruttoútlán úr føroyskum peningastovnum til húsarhald í Føroyum vaksin um 3% og um 6% til vinnukundar í Føroyum. Útlánsvøksturin talar ímóti, at búskapurin sum heild er ovhitaður, og talar ímóti, at vøksturin í búskapinum er lánifíggjaður vøkstur.

Innlán hjá húsarhaldum og vinnufyritøkum í føroyskum peningastovnum vaksa í løtuni. Innlán hjá føroyskum húsarhaldum eru vaksin út við 9% síðsta árið, og innlán hjá føroyskum vinnufyritøkum í føroyskum peningastovnum eru vaksin um 1% síðsta árið.

Skuldin hjá føroyskum húsarhaldum og vinnufyritøkum er ikki høg sammett við privata skuld í øðrum londum í Vesturheiminum. Skuldin hjá føroyskum húsarhaldum (brutto) kann metast til um 55% av BTÚ. Skuldin hjá húsarhaldum í Danmark og Noregi er til dømis væl omanfyri 100% av BTÚ, meðan skuldin hjá húsarhaldum í Íslandi er 75-80% av BTÚ. Í ES er skuldin hjá húsarhaldum í miðal á umleið sama stigi sum í Føroyum, um 60% av BTÚ.

**Mynd 3**
**Sethúsaprísir, indeks 1998 = 100, 1998 til 2018**




Viðm.: Sethúsaprísirnir eru úr uppgerðini hjá Betri Banka. Sethúsaprísir fyri 2018 eru miðalprísir fyri tríggjar teir fyrstu ársfjórðingarnar í 2018. Onnur tøl eru ársmiðal.
Kelda: Hagstovan og Betri Banki.

Mynd 3 omanfyri vísir gongdina í sethúsaprísum í landinum síðani 1998. Ymiskar orsøkir kunnu vera til, at sethúsaprísir hækka. Høvuðsorsøkin er helst, at inntøkurnar í samfelagnum hækka og at fólk soleiðis fáa meira av tiltøkupeningi og kunnu taka størri lán, umframt at rentustøðið hevur verið sera lágt í fleiri ár. Ein onnur orsøk er fólkavøksturin og tilflytingin, sum hevur verið síðstu árini og at tað ikki hevur verið bygt samsvarandi av nýggjum sethúsum og íbúðum síðstu árini.

Samanumtikið bendir nógv á, at framgongdin í búskapinum síðstu árini hevur verið haldfør og at hon er grundað á vaksandi framleiðslu og hækkandi inntøkur heldur enn at vera lánifíggjað framgongd.

Ein hákonjunkturur í búskapinum kann standa við í fleiri ár við stórari framgongd, um ovhiting og stórir ójavnar ikki taka seg upp í búskapinum. Hetta kann til dømis vera ógvusligur vøkstur í privatari skuld, ógvusliga hækkandi prísir á fastari ogn ella partabrøvum, stórt lønar- og kostnaðartrýst ella stór hall á handils- og gjaldsjavnanum. Í løtuni síggjast ikki greið tekin um, at tílíkir ójavnar eru um at taka seg upp í búskapinum.

## Fiski-, ali- og byggivinna nógv vaksnar síðstu árini

Føroyski búskapurin er vaksin støðugt síðstu sjey árini. Hagtølini benda eisini á, at vøksturin í búskapinum er hildin fram í 2019. Enn síggjast ikki tekin um, at framgongdin í búskapinum er hæsað av. Eins og nevnt omanfyri, roknar Fíggjarmálaráðið kortini við heldur lægri vøkstri í 2019 og 2020 sammett við til dømis árini 2013 til 2016.

**Mynd 4**
**Lønargjaldingar, býttar á ársfjórðingar, 1. ársfjórðing 1985 til 4. ársfjórðing 2018**




Viðm.: Mynd A vísir samlaðar lønargjaldingar í øllum vinnugreinum 1. ársfjórðing 1985 til 4. ársfjórðing 2018.
Mynd B vísir lønargjaldingar í fýra útvaldum vinnugreinum 1. ársfjórðing 2000 til 4. ársfjórðing 2018.
Kelda: Hagstovan.

Vøksturin í búskapinum síðani 2013 er í stóran mun komin av, at vinnugreinarnar fiski-, ali- og byggivinna eru nógv vaksnar. Lønargjaldingar í hesum vinnugreinunum og lønargjaldingar tilsamans síggjast í mynd 4 omanfyri. Harafturat er húsarhaldsnýtslan vaksin javnt síðstu um fýra árini, og nógvar almennar og privatar íløgur eru gjørdar.

Nettotilflytingin til landið er vaksin støðugt síðani 2014 (myndirnar 12 og 13). Nettotilflytingin er vaksin fyrst og fremst av, at fráflytingin av landinum er minkað, men tilflytingin til landið er eisini vaksin síðstu árini. Frá 2004 til 2013 var fráflyting av landinum netto (undantikið í 2008), men síðani 2014 hevur verið nettotilflyting. Nettotilflytingin er tekin um góðu gongdina í búskapinum og á arbeiðsmarknaðinum síðstu árini.

Eftirspurningurin frá húsarhaldum og fyritøkum er vaksin støðugt síðani 2014 (sí til dømis mynd 9), og eftirspurningurin tykist framvegis vera vaksandi. Hetta sæst millum annað í innflutningi av vørum til beinleiðis húsarhaldsnýtslu.

Konjunkturkanningin, sum Hagstovan gjørdi í januar í ár, vísir, at samanlagda vísitalið (sonevnda treystitalið) er lækkað eitt vet síðani á sumri 2018. Treystitalið fyri húsarhaldini er tó at kalla óbroytt sammett við á sumri 2018.

Mynd 5 vísir avreiðingar av botnfiski um avreiðingarskipanina í nøgd síðstu árini. Á myndini sæst, at hóast útlitini eru batnandi, eru nøgdirnar av feskfiski um avreiðingarskipanina framvegis eins smáar og árini fyrst í 1990'unum.

**Mynd 5**

**Føroyska feskfiskaveiðan eftir botnfiski í nøgd*, býtt á ársfjórðingar, tús. tons, 1993Q1 til 2018Q4**




* Tølini vísa veiðina, sum verður skrásett um avreiðingarskipanina og í avreiddari vekt. Í avreiðingunum er allur fiskiskapur hjá føroyskum skipum og bátum í føroyskum sjóøki, føroyska feskfiskaveiðan í íslendskum sjóøki og fiskiskapurin á Flemish Cap. Uppsjóvarfiskur er ikki við í uppgerðini.
Kelda: Hagstovan.

Samansetingin av føroyska útflutninginum er broytt síðstu árini (mynd 6). Størsti parturin av útflutninginum er nú aldur laksur og makrelur. Søguliga sæð hevur størsti parturin av føroyska útflutninginum verið toskur. Harafturat fer størsti parturin av útflutninginum til Russlands, sum vit ikki hava útflutt eins nógv til søguliga sæð. Í 2018 fóru um 27% av føroyska útflutninginum til Russlands. Broytingarnar, sum eru farnar fram síðstu árini í útflutninginum, eru lýstar í mynd 6.

**Mynd 6**

**Føroyski útflutningurin býttur á keyparalond og fiskaslag, mia. kr., 2007-2018 og 1993-2018**




* Mynd A vísir útflutning til fimm tey størstu keyparalondini í 2018. Myndin vísir árini 2007 til 2018. %-parturin av føroyska útflutninginum tilsamans eftir keyparalandi í 2018 er víst í klombur í mynd A.
* * Mynd B vísir virðið á útflutninginum úr Føroyum býtt á fiskasløg fyri árini 1993 til 2018. Myndin vísir sostatt ikki avreiðingarvirðið hjá føroyskum fiskiskipum. Orsøkin til, at nøgdirnar av svartkjafti ikki eru størri í myndini, er, at stórur partur av svartkjaftinum fer til fóður í sambandi við laksaaling í Føroyum og sæst tí ikki aftur sum útflutningur av svartkjafti í myndini.
Kelda: Hagstovan.

Ávísur váði er knýttur at verandi samanseting av føroyska útflutninginum. Tá ið út við 30% av útflutninginum fara á ein og sama marknað, er ávísur vandi fyri, at óvæntaðar hendingar, skiftandi umstøður ella skiftandi keypiorka á hesum marknaðinum kunnu ávirka føroyska útflutningin og búskapin munandi.

**Mynd 7**

**Tøka av aldum laksi og sílum í kruvdari vekt, býtt á ár, 1996 til 2019**




* Tøkan er í kruvdari vekt í tonsum. Metta tøkan í 2019 er grundað á fiskagoymsluna primo mars 2019 og á støddarbýtið á fiskagoymsluni.

Kelda: Hagstovan og Sp/F Avrik v. Rúna Dam.

Miðalprísurin á útfluttum laksi úr Føroyum var nakað lægri í 2018 sammett við 2017. Hetta var størsta orsøkin til, at útflutningurin av aldum laksi minkaði um 500 mió. kr. í 2018 ella um 14% sammett við 2017. Útlit eru til, at útflutningurin av laksi hækkar nakað aftur í 2019, mest orsakað av at nøgdirnar væntandi hækka 5-10% í 2019 sammett við 2018.

Prísirnir á aldum laksi eru hækkaðir nakað higartil í 2019. Í løtuni eru ikki útlit til munandi príslækkingar á aldum laksi næstu 1-2 árini, hóast hetta ikki kann sigast við vissu. Eftirspurningurin eftir aldum laksi veksur støðugt, og útboðið næstu árini fer mest sannlíkt ikki at vaksa eins nógv og eftirspurningurin. Hetta talar sum heild fyri, at laksaprísir vera nøkulunda støðugir ella hækka eitt vet næstu 1-2 árini, tó at príslækkingar eisini kunnu koma fyri ávís tíðarskeið.

Næstu árini kann roknast við, at alivinnan fer at geva eitt ískoyti til vøksturin í BTÚ. Tøkan kann roknast við at hækka 5-10% í 2019, og útbyggingar og íløgur verða gjørdar í smoltstøðir og kryvjivirki. Sum frálíður, fara hesar útbyggingar væntandi at hava við sær, at framleiðslan á landi kann hækka, at miðalstøddin á útsettum smoltum hækkar úr um 250 grammum til um 500 gramm og at vakstrartíðin á sjónum minkar úr um 18 mánaðir til um 12 mánaðir.

Síðani 2012 hevur tøkan av aldum laksi verið millum 60-70 tús. tons í kruvdari vekt. Sambært tøkumeting frá mars í ár kann roknast við, at tøkan hækkar 5-10% í 2019 sammett við 2018.[1] Mynd 7 omanfyri vísir tøku av aldum laksi og sílum síðani 1996 og mettu tøkuna av aldum laksi í 2019.

### *Gongdin á arbeiðsmarknaðinum*

Arbeiðsmarknaðurin í Føroyum tykist vera sera væl fyri. Arbeiðsloysið er um 1,1%, sum er metlágt (mynd 8A). Arbeiðsloysið í løtuni er tað lægsta, sum er skrásett síðani miðskeiðis í 1990'unum, tá

[1] Kelda: Sp/F Avrik v. Rúna Dam, aliráðstevnan, mars 2019.

ið skrásetingarnar byrjaðu. Harafturat hevur talið á løntakarum sett met við um 27.500 løntakarum (mynd 8B).

**Mynd 8**

**Árstíðarjavnað arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld, jan-2005 til jan-2019**




Kelda: Hagstovan.

Arbeiðsloysið er lækkað støðugt og javnt síðstu tvey árini og var 1,1% í januar 2019. Stór minking er nú eisini í arbeiðsloysinum í Suðuroy, har arbeiðsloysið annars hevur verið nakað hægri sammett við aðrastaðni í landinum. Arbeiðsloysið í Suðuroy var 2% í januar 2019, sum er eitt vet hægri enn aðrastaðni í landinum.

Tá ið arbeiðsloysið er so lágt eins og nú, kann neyvan roknast við, at arbeiðsloysið heldur áfram at lækka næstu tíðina. Mynd 8 omanfyri vísir arbeiðsloysið og talið á løntakarum síðstu árini.

**Talva 1**

**Lønargjaldingar eftir høvuðsvinnubólkum, 2015-2018, mió. kr.**

| Vinnugrein | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | Munur 2017-18 | Munur í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiski-, ali- o.o. ráevnisvinna | 1.668 | 1.788 | 1.866 | 1.887 | 21 | 1,1 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 1.029 | 1.121 | 1.274 | 1.458 | 184 | 14,4 |
| Privatar tænastuvinnur | 2.552 | 2.663 | 2.831 | 2.967 | 136 | 4,8 |
| Almenn o.o. tænasta | 2.775 | 2.901 | 2.985 | 3.135 | 150 | 5,0 |
| **Lønargjaldingar tilsamans** | **8.024** | **8.473** | **8.956** | **9.446** | **490** | **5,5** |

Kelda: Hagstovan.

Gongdin í lønargjaldingum býtt á høvuðsvinnubólkar sæst í talvu 1. Samanumtikið vuksu lønargjaldingarnar 5,5% í 2018. Serliga lønargjaldingar innan byggivinnu vuksu í 2018 sammett við

í 2017 (sí eisini mynd 4). Lønargjaldingar hækkaðu eisini í privatum tænastuvinnum og innan almenna tænastu í 2018.

Talið á løntakarum, sum hava A-inntøku, er vaksið støðugt og javnt síðani 2014 (mynd 8B) til um 27.500 løntakarar um ársskiftið 2018/19. Skrásetta talið á løntakarum í Føroyum hevur ikki verið hægri áður, og løntakaratalið hevur sett met síðstu mánaðirnar. Nevnt kann verða, at løntakarar, sum bara hava B-inntøku ella sum bara hava inntøku uttanlands eru ikki íroknaðir í talið á løntakarum í mynd 8B ella í talvu 2.

**Talva 2**
**Løntakarar í desember eftir høvuðsvinnubólkum, 2015-2018, fólk í tali**

| Vinnubólkur | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | Munur 2017-18 | Munur í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiski-, ali- o.o. ráevnisvinna | 4.141 | 4.182 | 4.325 | 4.506 | 181 | 4,2 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 3.445 | 3.679 | 3.919 | 4.243 | 324 | 8,3 |
| Privatar tænastuvinnur | 8.525 | 8.623 | 8.934 | 9.063 | 129 | 1,4 |
| Almenn o.o. tænasta | 9.079 | 9.331 | 9.319 | 9.646 | 327 | 3,5 |
| **Løntakarar tilsamans** | **25.190** | **25.815** | **26.497** | **27.458** | **961** | **3,6** |

Kelda: Hagstovan.

Talva 2 vísir gongdina í løntakarum býtt á høvuðsvinnugreinar síðani 2015. Síðani 2015 er løntakaratalið vaksið mest í byggivinnuni. Stór afturgongd var annars í løntakaratalinum í byggivinnuni eftir fíggjar- og búskaparkreppuna í 2009 og 2010. Vøksturin í talinum av løntakarum í byggivinnuni er hildin fram í 2018, sum eisini sæst í talvu 2. Løntakaratalið vaks 3,6% frá 2017 til 2018, sum svarar til út við 1.000 fólk um árið.

### *Eftirspurningur og brúkaraprísir*

Eftirspurningurin frá húsarhaldum er vaksin støðugt síðani 2014. Hagtøl fyri vøruinnflutning benda á, at vøksturin í eftirspurningi helt fram í 2018, tó at vøksturin var lægri sammett við 2017. Innflutningurin til beinleiðis húsarhaldsnýtslu vaks um 9% í 2017 og um 2% í 2018.

**Mynd 9**

**Innflutningur av ódrúgvum, drúgvum og hálvdrúgvum nýtsluvørum og útgoldnar lønir, jan-1998 til feb-2019**




Viðm.: Myndin vísir 12-mánaðar samanløgd tøl fyri tær tríggjar strikurnar í myndini.

Kelda: Hagstovan.

Tekin um vaksandi eftirspurning síggjast eisini í inntøkunum hjá landinum av meirvirðisgjaldinum. Mynd 9 vísir innflutning av ymiskum bólkum av nýtsluvørum, býtt á drúgvar og ódrúgvar vørur, sammett við útgoldnar lønir.

**Mynd 10**

**Samanvigað konjunkturvísital og vísital fyri húsarhald, jan-2006 til jan-2019**




Kelda: Hagstovan.

Sambært nýggjastu konjunkturkanningini frá Hagstovuni eru húsarhaldini framvegis bjartskygd um framtíðina og rokna við lágum arbeiðsloysi og støðugari búskapargongd næsta árið. Mynd 10 vísir samanvigaða vísitalið og vísitalið fyri húsarhald. Samanvigaða konjunkturvísitalið fyri vinnu og húsarhald var at kalla óbroytt í síðstu konjunkturkanningini (mynd 10A).

Brúkaraprístalið hevur verið rættiliga støðugt síðani 2009. Sambært uppgerðunum av brúkaraprístalinum, er prístalið hækkað nakað síðani tíðliga í 2016. Miðalbrúkaraprístalið er hækkað 1,2% síðsta árið. Brúkaraprístalið er víst í mynd 11 niðanfyri.

**Mynd 11**

**Brúkaraprístalið, 1. ársfjórðing 2001 til 4. ársfjórðing 2018, býtt á ársfjórðingar, indeks 2001 = 100**




Kelda: Hagstovan.

Oljuprísir hava stóra ávirkan á brúkaraprísir sum heild. Ein høvuðsorsøk til, at prístalið hækkar aftur, er óivað, at oljuprísir eru hækkaðir í 2016 og 2017. Týdningurin av brennievni í føroyska innflutninginum sæst millum annað av, at um 17% av innflutninginum í 2018 var brennievni.

Rentustøðið hevur eisini stóra ávirkan á gongdina í brúkaraprísum og serliga á kostnaðin á at eiga ella leiga sær bústað. Síðstu nógvu árini hevur rentustøðið verið sera lágt, og kappingin hevur verið og er framvegis hørð millum peningastovnarnar. Hetta er eisini ein høvuðsorsøk til, at brúkaraprístalið hevur verið at kalla óbroytt ella er hækkað sera lítið síðani 2009.

### *Gongdin í til- og fráflyting*

Gongdin, sum byrjaði í 2014 við nettotilflyting til landið, er hildin fram og hevur tikið dik á seg síðstu trý árini. Í løtuni síggjast ikki tekin um, at nettotilflytingin fer at minka aftur í bræði ella at fráflyting fer at taka seg upp aftur. Nettotilflytingin er í løtuni um 550 fólk um árið (mynd 12).

**Mynd 12**

**Nettoflyting til Føroyar, 12 mánaðir samanlagt, til- og fráflyting, jan-2007 til feb-2019**




Viðm.: Grønu og reyðu stabbarnir vísa ávikavist til- og fráflyting hvønn mánaða.
Kelda: Hagstovan.

Nettotilflytingin kemur bæði av minni fráflyting av landinum og av størri tilflyting til landið. Størra ískoytið til fólkavøksturin kemur kortini av minni fráflyting av landinum (mynd 12).

Nettotilflytingin til landið er nú áleið á sama støði sum árini beint eftir aldaskiftið, tá ið búskapurin fótaði sær aftur eftir kreppuna í 1990'unum (mynd 13). Meðan fráflytingin nú á fimta ári hevur lagt seg á eitt javnt lágt støði á umleið 1.200 fólk árliga, veksur hinvegin tilflytingin framvegis, og er nú komin upp móti 1.800 fólkum árliga.

**Mynd 13**
**Broytingar í fólkatalinum, 1970 til 2018**




Kelda: Hagstovan.

Fráflytingin síðstu 4-5 árini hevur verið tann minsta, sum er skrásett síðani tíðliga í 1980'unum. Roknað í mun til fólkatalið, var fráflytingin í 2017 og 2018 tann minsta, sum er skrásett í hagtalsgrunninum, ið gongur aftur til 1970. Tilflytingin til landið var stór bæði í 2017 og aftur í 2018. Tilflytingin hesi árini var tann størsta, sum er skrásett síðani 2002. Samanlagda úrslitið av minni fráflyting og størri tilflyting er, at nettotilflytingin er vaksin í stórum, og ongantíð hevur verið so stór sum nú, hvørki í tali ella lutfalsliga.

**Mynd 14**
**Fólkatalið í Føroyum 1. januar, 1985-2019**




Kelda: Hagstovan.

Gongdin við nettotilflyting til landið er tekin um, at arbeiðsmarknaðurin er væl fyri í løtuni og at fleiri størv hava tikið seg upp í landinum. Ein onnur orsøk til gongdina er, at útbúgvingarmøguleikarnir eru vorðnir betri og at færri tí fara av landinum at útbúgva seg. Síðstu árini eru fleiri nýggjar útbúgvingar settar á stovn bæði á miðnámsstigi og innan hægri útbúgvingar. Nettotilflytingin býtt á mánaðir og ár er víst í myndunum 12 og 13.

**Talva 3**

**Fólkatalið býtt á øki í landinum, 1. feb. 2018 til 1. feb. 2019**

| Øki í landinum | Fólkatal 1. feb. 2018 | Burðaravlop | Nettoflyting | Fólkatal 1. feb. 2019 | Broyting í tali | Broyting í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðuroyggjar | 6.085 | 32 | 33 | 6.150 | 65 | 1,1 |
| Eysturoy | 11.318 | 98 | 139 | 11.555 | 237 | 2,1 |
| Tórshavnarøkið* | 19.348 | 119 | 326 | 19.793 | 445 | 2,3 |
| Streymoyggin annars | 4.723 | 36 | 26 | 4.785 | 62 | 1,3 |
| Vágoy | 3.230 | 24 | 39 | 3.293 | 63 | 2,0 |
| Sandoy | 1.275 | -6 | -2 | 1.267 | -8 | -0,6 |
| Suðuroy | 4.617 | -12 | -8 | 4.597 | -20 | -0,4 |
| **Alt landið** | **50.596** | **297** | **553** | **51.440** | **844** | **1,7** |

*Tórshavn, Hoyvík og Argir.
Kelda: Hagstovan.

At nettotilflyting er til landið er eitt gott tekin fyri búskapin. Heldur tilflytingin fram, fer hetta at betra langtíðarhaldførið í búskapinum. Hóast nettotilflyting er til landið nú, benda framrokningar á, at aldurs- og fólkasamansetingin fer at broytast næstu árini, soleiðis at lutfalsliga færri fólk vera í arbeiðsførum aldri.

Á mynd 14 sæst, at fólkatalið í Føroyum nú er omanfyri 51 tús. fólk (sí eisini talvu 3). Myndin vísir eisini, at fólkatalið í landinum var at kalla óbroytt frá 1990 til 2014. Veruligur fólkavøkstur hevur nú tikið seg upp í landinum eins og árini fyri síðsta aldaskiftið, tá ið búskapurin fótaði sær aftur eftir kreppuna í 1990'unum.

Størsti parturin av fólkavøkstrinum síðstu árini hevur verið í miðøkinum í landinum og serstakliga í høvuðsstaðarøkinum og í Eysturoynni. Hinvegin er fólkatalið minkað ella hevur staðið í stað í Suðuroynni og Sandoynni. Í talvu 3 síggjast broytingar í fólkatalinum síðstu 12 mánaðirnar, býtt á høvuðsøki í landinum.

Sama rák sæst í øðrum londum í Vesturheiminum, har fólk flyta frá smærri býum og bygdum móti størru býarøkjunum. Roknast kann við, at gongdin, har fólk flyta frá útjaðarum móti miðøkinum, fer at halda fram næstu árini. Nógv bendir á, at tað, sum frálíður, verður torførari hjá útjaðaraøkjum at standa seg í kappingini móti miðøkjunum og stóru býunum.

Á mynd 15 niðanfyri sæst fólkasamansetingin í Føroyum fyri árini 2000 og 2018 og býtt á aldursbólkar. Myndin vísir, at síðani 2000 er aldursbólkurin 65 ár og eldri vaksin um 43%, meðan

tey í arbeiðsførum aldri (18 til 64 ár) eru vorðin 9% fleiri. Gongdin í myndini er eitt dømi um ta demografisku avbjóðingina hjá tí almenna næstu árini, og forsagnir benda á, at gongdin í myndini fer at halda fram næstu árini. Broytingin í aldurssamanseting, sum sæst í myndini, er ein orsøk til stóra trýstið, sum er á útreiðslurnar innan fleiri almenn vælferðarøki, til dømis innan heilsu- og almannaverkið.

**Mynd 15**

**Fólkatalið tilsamans, býtt á aldursbólkar og ár, 2000 og 2018**




Viðm.: Tølini inni í lagkøkumyndini vísa fólkatalið tilsamans býtt á aldursbólkarnar. Tølini í % í klombur vísa broytingina í fólkatali frá 2000 til 2018 býtt á aldursbólkarnar.
Kelda: Hagstovan.

## Viðskifti við útlond, handils- og gjaldsjavni

Gongdin á handils- og gjaldsjavnanum síðstu árini er merkt av, at býtislutfallið í uttanríkishandlinum er batnað munandi síðani 2013. At býtislutfallið er batnað merkir, at prísirnir á útfluttum vørum eru hækkaðir sammett við prísirnar á innfluttum vørum, til dømis á olju.

**Mynd 16**

**Innflutningur og útflutningur av vørum, mió. kr., 1988 til 2018**




Viðm.: Handilsjavnin fevnir bara um vørur; tænastur eru sostatt ikki við í uppgerðini av handilsjavnanum.
Kelda: Hagstovan.

Olja og brennievni eru millum størstu vørubólkarnir, sum vit innflyta. Stóra lækkingin í oljuprísinum árini 2014-16 hevði við sær, at okkara innflutningsprísir í miðal lækkaðu hesi árini. Samstundis hækkaðu prísirnir á aldum laksi sera nógv í 2013 og aftur í 2016, og prísirnir á uppsjóvarfiski hava eisini verið góðir. Samanumtikið hevur gongdin havt við sær, at býtislutfallið í uttanríkishandlinum er batnað síðani 2013 (tó ikki í 2017).

**Mynd 17**

**Rakstrarviðskifti gjaldsjavnans í mió. kr., 1998 til 2018**




* Tølini fyri 2013 til 2018 eru metingar og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: Hagstovan.

Síðani 2014 hava avlop verið á handilsjavnanum, og roknast kann við avlopi aftur í ár. Avlopið á handilsjavnanum í 2018 minkaði sammett við í 2017, orsakað av minni kvotum, minni tøku av aldum laksi, lægri laksaprísum og hægri oljuprísum (mynd 16). Roknast kann við, at avlopið á handilsjavnanum og á gjaldsjavnanum veksur aftur í 2019, millum annað orsakað av at roknast kann við størri útflutningi.

Føroyski gjaldsjavnin er ikki gjørdur upp síðani 2015 og er tí sera torførur at meta um. Gongdin í handilsjavnanum bendir kortini á, at stór avlop eisini hava verið á gjaldsjavnanum síðani 2013, tó at hetta er torført at meta um. Myndirnar 16 og 17 vísa gongdina í handils- og gjaldsjavnanum síðstu árini.

Handilsjavnin fevnir bara um vøruhandil við útlond; tænastuveitingar til og frá útlondum eru sostatt ikki taldar við í handilsjavnan. Tænastuveitingar eru hinvegin taldar við í *vøru- og tænastujavnan*.

Uppgerðir hjá Hagstovuni av tænastujavnanum benda á, at Føroyar hava hall á tænastujavnanum við útlond á millum hálva og eina mia. kr. árliga. Óvissan er kortini stór í hesum uppgerðum, og óvist er, hvussu eftirfarandi uppgerðir av føroyska tænastujavnanum eru.

Handilsjavnin sveiggjar nógv frá ári til ár alt eftir privatari nýtslu, íløgum í vinnulívinum, oljuprísum og útflutningsvirðinum á fiski og aldum laksi. Eins og víst í mynd 16 omanfyri, er føroyski útflutningurin vaksin úr 4,1 mia. kr. í 2009 til 8,8 mia. kr. í 2017 og um 8 mia. kr. í 2018. Útflutningurin er sostatt tvífaldaður hesi átta árini.

## Heimsbúskapurin

Metingar benda á, at framgongdin í heimsbúskapinum er minka nakað síðsta hálva árið. Altjóða búskaparstovnar rokna nú við heldur minni vøkstri næstu 1-2 árini enn áður. Stígur tykist millum annað vera komin í búskapirnar í Evropa, millum annað í Týsklandi og Bretlandi. Búskaparvøkstur er framvegis í USA, men stígur tykist nú vera komin í búskaparvøksturin, sum hevur verið í Kina.

**Talva 4**
**Árligur vøkstur í BTÚ í føstum prísum 2016-2020 býtt á øki**

| *% um árið í føstum prísum* | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| USA | 1,5 | 2,2 | 2,9 | 2,6 | 2,2 |
| Evruøkið | 1,9 | 2,4 | 1,8 | 1,0 | 1,2 |
| Bretland | 1,8 | 1,8 | 1,4 | 0,8 | 0,9 |
| Týskland | 2,2 | 2,5 | 1,4 | 0,7 | 1,1 |
| Japan | 1,0 | 1,9 | 0,7 | 0,8 | 0,7 |
| Heimsbúskapurin | 3,2 | 3,8 | 3,6 | 3,3 | 3,4 |

Viðm.: Tølini fyri 2018 eru fyribils metingar. Tølini fyri 2019 og 2020 eru forsagnir og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: IMF World Economic Outlook Update, 11. januar 2019, og OECD Interim Economic Outlook, 6. mars 2019.

Samanumtikið verður roknað við minni búskaparvøkstri nú í 2019 og 2020 í Evropa og í Heimsbúskapinum sammett við fyri hálvum ári síðani. Roknast kann við, at heimsbúskapurin veksur 3-3,5% í 2019 og 2020 (talva 4). Vøksturin í heimsbúskapinum kemur serliga av gongdini í USA og menningarlondunum. Hinvegin kann roknast við minni vøkstri í Evropa og Bretlandi. Talva 4 omanfyri vísir metingar frá OECD og IMF um vøkstur í BTÚ í útvaldum londum fyri árini 2016-2020. Í talvu 5 eru vístar metingar í ársins prísum.

Stórar óvissur eru framvegis um búskapargongdina í Bretlandi. Óvissan kemur av, at Bretland eftir ætlan fer úr ES í mars mánaði í ár. Dagurin, tá ið Bretland fer úr ES og freistin at semjast um eina avtalu í hesum sambandi, er fyribils fluttur til 12. apríl ella 22. mai í ár.

Nógv bendir á, at skatta- og fíggjarpolitikkurin í USA verður minni stimbrandi næstu árini sammett við í 2017 og 2018. Vøkstur er framvegis í innlendis eftirspurninginum og privatu íløgunum í USA. Hetta fer væntandi at stimbra búskapin næstu tvey árini.

Ein óvissa um gongdina í heimsbúskapinum næstu tvey árini eru tey handilstiltøk og verjutollir, sum USA og Kina hava sett í verk. Endamálini eru at verja innlendis arbeiðspláss í USA og Kina. Verður talan um fleiri tílík handils- og revsitiltøk í næstum millum USA og Kina, er vandi fyri, at heimshandilin verður ávirkaður. Hetta kann síðani eisini skala búskaparvøksturin í Evropa og um okkara leiðir.

**Talva 5**
**Árligur vøkstur í BTÚ í ársins prísum 2013-2020 býttur á lond**

| *% um árið í ársins prísum* | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | *2019* | *2020* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 7,6 | 8,1 | 5,5 | 9,3 | 4,1 | 2,4 | *3,6* | *3,0* |
| Danmark | 1,8 | 2,7 | 2,8 | 3,1 | 3,7 | 1,5 | *3,9* | *3,6* |
| Ísland | 6,4 | 5,9 | 10,3 | 9,4 | 4,5 | 6,0 | *6,8* | *6,0* |
| Noreg | 3,6 | 2,3 | -0,9 | 0,0 | 5,9 | 7,6 | *5,2* | *4,5* |
| Bretland | 4,0 | 4,7 | 2,8 | 3,9 | 3,8 | 3,2 | *3,2* | *2,9* |
| USA | 3,6 | 4,4 | 4,0 | 2,7 | 4,2 | 5,2 | *5,0* | *4,6* |
| Evruøkið | 1,0 | 2,3 | 3,4 | 2,7 | 3,6 | 3,4 | *3,6* | *3,5* |
| OECD-miðal | 3,1 | 4,0 | 4,1 | 3,3 | 4,7 | 4,8 | *4,7* | *4,6* |

Viðm.: Tølini fyri 2018 eru metingar. Tølini fyri 2019 og 2020 eru forsagnir og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: OECD, Hagstovan og metingar hjá Fíggjarmálaráðnum.

Búskaparvøksturin í Evropa var um 1,8% í 2018 og verður væntandi um 1% í 2019, sí talvu 4. Vøksturin er minkaður sammett við í 2017 orsakað av, at minni vøkstur er í privatu nýtsluni og innlendis eftirspurninginum. Harafturat er rentustøðið hækkað í Suðurevropa, umframt at ófriður hevur verið á arbeiðsmarknaðinum í Fraklandi, og mótmæli hava verið. Framleiðslan av bilum í Týsklandi er eisini minkað eftir, at nýggir mátihættir viðvíkjandi útláti av $CO_2$ eru komnir í gildi.

**Talva 6**
**Arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld, 2011-2019, býtt á lond og ár**

| Arbeiðsloysi í % | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | *2019* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 7,0 | 5,6 | 4,5 | 3,8 | 2,9 | 2,8 | 2,4 | 1,8 | *1,5* |
| Danmark | 7,6 | 7,5 | 7,0 | 6,6 | 6,2 | 6,2 | 5,7 | 5,4 | *5,3* |
| Ísland | 7,0 | 6,0 | 5,4 | 4,9 | 4,0 | 3,0 | 2,7 | 3,2 | *3,3* |
| Noreg | 3,2 | 3,1 | 3,4 | 3,5 | 4,3 | 4,7 | 4,2 | 3,8 | *3,7* |
| Bretland | 8,0 | 7,9 | 7,5 | 6,1 | 5,3 | 4,8 | 4,3 | 4,1 | *4,2* |
| USA | 9,0 | 8,1 | 7,4 | 6,2 | 5,3 | 4,9 | 4,4 | 3,9 | *3,5* |
| Evruøkið | 10,1 | 11,3 | 12,0 | 11,6 | 10,8 | 10,0 | 9,0 | 8,3 | *8,0* |

Viðm.: Tølini fyri 2018 og 2019 eru metingar og forsagnir og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: Hagstovan og IMF.

Búskapirnir í Evropa hava í fleiri ár verið merktir av lágari privatari nýtslu og av at vinnufyritøkur hava gjørt færri íløgur enn vanligt. Arbeiðsloysið er framvegis høgt í Evropa, og væntandi verður arbeiðsloysið høgt í nøkur ár frameftir. Arbeiðsloysið býtt á ymisk lond er víst í talvu 6 omanfyri.

Metingar av búskaparvøkstri frá OECD og IMF í fleiri londum eru vístar í talvunum 4 og 5 omanfyri. Sum heild eru útlit til vøkstur á 1-1,2% í Evropa næstu 1-2 árini. Í USA eru útlit til nakað hægri vøkstur á um 2,5% næstu árini.

Búskapurin í Evropa og allur heimsbúskapurin hava síðstu árini verið stimbraðir av stuðulstiltøkum frá miðbankum og av serstakliga lágum rentum. Miðbankin í USA hækkaði leiðandi renturnar fýra ferðir í 2018. Í løtuni er mest sannlíkt, at renturnar halda fram at hækka spakuliga í ár, men roknað verður nú bara við einari ella tveimum rentuhækkingum í 2019. Rentustøðið í USA er framvegis serstakliga lágt.

Verandi útlit fyri búskaparvøkstur og arbeiðsloysið í Evropa og tað at Bretland eftir ætlan fer úr ES í ár tala fyri, at rentustøðið í Evropa verður verandi lágt næstu 1-2 árini. Rentustøðið kann kortini hækka nakað úr verandi søguliga lága støði. Miðbankin í Evropa er í smáum farin undir at minka tey stuðulstiltøk, sum bankin hevur sett í verk síðstu árini, og miðbankin keypir nú minni nøgdir av lánsbrøvum á fíggjarmarknaðinum sammett við fyri hálvum ári síðani.

## Almenn fíggjarmál

Her verður stutt hugt eftir gongdini í úrslitinum hjá landskassanum og tí almenna sum heild síðstu árini. Mynd 18 niðanfyri vísir gongdina í inntøkum og útreiðslum hjá landskassanum og í RLÚ-úrsliti síðani 1997 við mettum tølum fyri 2018, játtanartølum fyri 2019 og tølum fyri árini 2020-24 úr uppskotinum til játtanarkarmar.

**Mynd 18**
**Úrslit landskassans, mió. kr., 1997 til 2018, játtanar- og ætlanartøl fyri 2019 til 2024**




Viðm.: Tølini fram til og við 2017 eru roknskapartøl. Avlopið fyri 2018 verður mett til 270-290 mió. kr. Tølini fyri 2019 eru játtanartøl, og tølini fyri árini 2020 til 2024 eru úr uppskotinum til játtanarkarmar. Kommunurnar yvirtóku eldraøkið í 2015. Tí lækkaðu inntøkur og útreiðslur hjá landinum í 2015.
* Úrslitið fyri 1998 er ávirkað av eftirgeving av donskum ríkislánum til Føroyar á 900 mió. kr.
Kelda: Gjaldstovan.

Á mynd 18 sæst, at útreiðslurnar hjá landskassanum vuksu skjótari enn inntøkurnar frá 2008 til 2014. Frá 2015 og frameftir eru inntøkurnar hinvegin vaksnar munandi skjótari enn útreiðslurnar. Hetta hevur síðani havt við sær, at landskassin hevur havt avlop síðani 2016.

Landskassin hevði hall øll árini frá 2008 til 2015 á tilsamans um 3 mia. kr. Síðani 2016 og íroknað væntaða avlopinum í 2019 hevur landskassin havt avlop á um 1,4 mia. kr. Avlopið hjá landskassanum í 2018 verður mett til 270-290 mió. kr. Roknast kann við, at landskassin hevur avlop á 350-400 mió. kr. í 2019. Síðstu um 5 árini hava inntøkurnar hjá landinum verið væl hægri enn upprunaliga mett í fíggjarlógunum, sum er komið av góðu gongdini í búskapinum.

Myndin vísir eisini, at inntøkurnar hjá landskassanum ávirkast nógv av konjunkturgongdini, meðan útreiðslurnar eru meiri støðugar.

**Mynd 19**

**Langfreistaða skuld landskassans og gjaldføri landskassans í mió. kr., 1997 til 2019**




Viðm.: Langfreistaða skuld landskassans er lánsbrævaskuld á um 4,6 mia. kr. við ársbyrjan 2018 umframt eitt rentu- og avdráttarfrítt lán á 500 mió. kr. frá danska statinum, sum fall burtur í 2018. Lógarkravda minstagjaldførið hjá landskassanum (t.e. 15% av BTÚ) er víst við gulu strikuni í myndini.
Kelda: Gjaldstovan, Landsbankin og Fíggjarmálaráðið.

Mynd 19 vísir gongdina í langfreistaðu skuldini (brutto) og innistandandi hjá landinum. Gongdin frá 2008 til 2014, har inntøkurnar hjá landskassanum frá skattum og avgjøldum ikki vuksu í sama mun sum útreiðslurnar, gav eina verri javnvág millum inntøkur og útreiðslur hjá landinum hesi árini. Hetta sæst aftur sum vaksandi skuld hesi árini. Føroyski búskapurin vaks kortini somikið nógv hesi árini, at langfreistaða skuldin roknað í prosentum av búskapinum ikki vaks stórvegis.

Fyri haldførið í almenna búskapinum er týdningarmikið, at nettoskuldin yvir longri áramál ikki veksur skjótari enn samlaðu inntøkurnar í samfelagnum, sum skulu fíggja rentuútreiðslurnar av skuldini. Hetta merkir, at nettoskuld í % av BTÚ ikki hækkar støðugt yvir tíð, tá ið atlit eisini eru tikin at konjunkturgongdini.

Búskaparráðið hevur síðstu árini mett um langtíðarhaldførið í almenna búskapinum. Í nýggjastu frágreiðingini frá ráðnum verður mett, at haldførisavbjóðingar framvegis eru í almenna geiranum, og at tær í stóran mun stava frá demografisku gongdini, sum roknast kann við í framtíðini. Búskaparráðið mælir tí til at seta í verk ítøkilig tiltøk næstu árini fyri at bøta um javnvágina millum almennu inntøkurnar og útreiðslurnar.

Tað almenna í Føroyum er ikki serstakliga skuldarbundið sammett við onnur lond í Vesturheiminum. Bruttoskuldin hjá landinum er um 25% av BTÚ, og kommunurnar hava bruttoskuld á 5-10% av BTÚ. Almenna bruttoskuldin í londunum í Evropa er 80-85% av BTÚ í miðal, og almenna bruttoskuldin í Danmark er mett til um 35% av BTÚ. Almenna skuldin í Íslandi er mett til 30-35% av BTÚ.

Ein av lærunum frá fíggjar- og búskaparkreppuni, sum byrjaði í 2008, er, at almenna skuldin kann hækka ógvusliga, um álvarsligir stoytir raka búskapin og um stórar kreppur taka seg upp. Í tílíkum førum er umráðandi at hava fíggjarpolitiskt rásarúm til at seta tiltøk í verk og at kunnu reka ein konjunkturmótgangandi búskaparpolitikk.

Ein óvissa viðvíkjandi almenna búskapinum næstu árini er sjálvsagt, at rentustøðið á skuldini er óvanliga lágt í løtuni. Roknast kann við, at rentustøðið fer at hækka nakað næstu árini, hóast tað er ógjørligt at meta um hvussu skjótt ella hvussu nógv tað fer at hækka.

**Mynd 20**
**Nettoskuld landskassans (langfreistað skuld frádrigið gjaldføri) í mió. kr., 1997 til 2019**




Viðm.: Nettoskuld er í myndini víst sum langfreistaða skuldin hjá landskassanum frádrigið gjaldførið hjá landskassanum.
Kelda: Gjaldstovan, Landsbankin og Fíggjarmálaráðið.

Tá ið rentustøðið hækkar, fer tað, sum frálíður, at kosta landi og kommunum pening í hægri rentuútreiðslum. Lánsbrævaskuldin hjá landinum er í løtuni um 4,6 mia. kr. Sambært Landsbankanum er gjaldføri landsins í løtuni um 3,8 mia. kr. Nettoskuldin er sostatt um 800 mió. kr. Gongdin í nettoskuldini hjá landskassanum er eisini víst í mynd 20.

Hvørt prosent, sum miðalrentustøðið á lánskuldini hækkar næstu árini, fer, sum frálíður at kosta landinum út við 50 mió. kr. brutto árliga í hægri rentuútreiðslum av skuldini. Hækkar rentustøðið, fær landið hinvegin eisini hægri avkast av gjaldførinum. Afturgjaldstíðin á lánsbrævaskuldini hjá landskassanum hevur síðstu árini verið 4-5 ár. Tí fer tað ikki at ávirka rentuna á allari skuldini alt fyri eitt, um og tá ið altjóða rentustøðið aftur hækkar.

Kommunurnar hava samanlagt havt avlop í nøkur ár, og sosialu grunnarnir hava somuleiðis havt avlop. Úrslitini hjá kommununum fyri 2018 eru ikki gjørd endaliga upp enn, men kommunurnar høvdu sannlíkt hall á 70-80 mió. kr. í 2018. Úrslitið hjá tí almenna tilsamans í 2018 var helst avlop á 350-450 mió. kr., ella 1,5-2% av BTÚ.

Metingar hjá Fíggjarmálaráðnum av bygnaðarliga úrslitinum í almenna geiranum benda á, at tað almenna hevur havt bygnaðarligt avlop síðani 2016. Metingarnar benda eisini á, at bygnaðarliga avlopið var 0,5-1% av BTÚ í 2018. Bygnaðarliga avlopið verður sannlíkt nakað hægri, um 1,5% av BTÚ í 2019. Óvissan í metingunum er stór, og metingarnar skulu lesast við fyrivarnum.

*Tilmæli viðvíkjandi kommununum*

Kommunurnar eru tilsamans umleið ein triðingur av almenna geiranum. Harvið eru kommunurnar týðandi partur av almenna búskapinum og av búskapinum sum heild. Skulu Føroyar hava fullgóða búskaparstýring, er tí neyðugt, at land og kommunur samskipa fíggjarpolitikkin í størri mun. Hetta hevði tryggjað, at land og kommunur í størri mun høvdu kunnað sett í verk neyðug átøk at tryggja eina støðuga búskapargongd.

Kommunalu roknskapirnir fyri 2018 eru ikki endaligir enn, men fyribils verður mett, at kommunali raksturin er vaksin til áleið 1,85 mia. kr., ið er umleið 5 prosent meir enn í 2017. Hetta er væl meira, enn játtanarkarmarnir hjá landinum løgdu upp til. Sambært samtyktu fíggjarætlanunum kann roknast við, at kommunalu rakstrarútreiðslurnar aftur í ár vaksa við umleið 5 prosentum.

Mett verður, at hesin útreiðsluvøksturin er ov høgur. Tí verður mælt til, at kommunurnar, tá ið tær fara undir arbeiðið við fíggjarætlanunum fyri 2020, leggja seg eftir, at rakstrarútreiðslurnar ikki vaksa við meira enn teimum 3,5 prosentunum, ið játtanarkarmarnir hjá landinum leggja upp til.

Fyri nøkrum árum síðani var árliga støðið á kommunalu løguútreiðslunum nakað niðanfyri 400 mió. kr. Í 2016 vuksu løguútreiðslurnar tó til 486 mió. kr., í 2017 til 518 mió. kr. og í 2018 fara tær at tátta í 700 mió. kr.

Sambært samtyktu fíggjarætlanunum fyri 2019 ætla kommunurnar at gera løgur fyri 725 mió. kr. Íroknað óbrúktar játtanir, ið vanliga verða endurjáttaðar, tá ið roknskapurin fyri farið ár er uppgjørdur, verða kommunalu løgujáttanirnar tí helst omanfyri 1,1 mia. kr. í 2019. Hetta verður sostatt triðja árið á rað, at samlaðu løgujáttanirnar hjá kommununum vera omanfyri 1 mia. kr.

Seinnu árini hava kommunurnar vanliga ikki brúkt samlaðu løgujáttanina, og soleiðis verður helst eisini í 2019. Sambært upplýsingum, ið Búskaparráðið hevur fingið frá kommununum, kann tó roknast við løguútreiðslum í 2019 fyri umleið 800 mió. kr. Helst kann eisini roknast við løgum fyri líknandi upphædd í 2020.

Eftir fáum árum er talan um tvífalding av løguútreiðslunum og mett verður, at støðið í dag er ov høgt. Mælt verður tí til, at kommunurnar samanlagt seta sær fyri at fáa løguútreiðslurnar niður aftur á eitt støði, sum liggur um 400 mió. kr. árliga.